# Skrá yvir leysar lutir í húsunum
# *við Brunn*




*Niels Christian Brandt, august 1979*

# 2022

# Húsini *við Brunn*

Fyrsti maður, ið hevur búð við Brunn, er Hendrik Jacobsen. Hetta sæst, tá ið hugt verður eftir forbókstavunum (HİS) í øðrum av durastavunum í ovaru hæddini á húsunum. Í durastavin eru skornir forbókstavirnir á 8 ættarliðum av monnum, ið hava búleikast við Brunn. Nøvnini á teimum hava verið Hendrik ella Jacob aðruhvørja ferð. Ikki fyrr enn við skiftið í 1890 kemur eitt nýtt navn í durastavin. Tað er İ.İ., ið stendur fyri Joen Jacobsen (Jógvan við Brunn, Bøkjarin nevndur). Eldri bróðirin, Jacob Jacobsen (Jákup á Skúr), ið sum vanligt, var uppkallaður eftir abbanum, flutti úr Brunn og bygdi sær nýggj hús – nevnd á Skúr.

Tað elsta, sum er í húsunum, er roykstovan. Tað sæst, at hon er gjørd úr rekaviði og er frá fyrru helvt av 17. øld.

Í einum skifti í 1765 sæst, at har er ein lítil glasstova við einum lítlum vindeyga, einum seingjarstaði, einum lítlum skápi – bygt aftur at roykstovuni.

Eystara partin av húsunum – stovuna í neðra – læt Jacob Hendriksen (Gamli Jákup) byggja í 1828.

Tá ið stovan var liðug, varð fjós bygt upp í eystara enda av húsunum; men tað er nú tikið niður. Sagt verður, at tá ið Fríðrikur 8. var á kongsvitjan í Føroyum í 1907, og hann eisini í tí sambandi kom út til Nólsoyar, ynskti kongur at síggja eitt fjós innan. Hann varð tá boðin inn í fjósið við Brunn, tí tað var tað nossligasta, sum var í bygdini.

Meðan sonur Gamla Jákup, Henrich Michael Jacobsen, situr við ognini (1848-1890), verður bygt oman á húsini: fyrst tann vestara partin og nakað seinni – eystara partin; men óivað eigur Gamli Jákup, ið bæði var træ- og jarnsmiður, bróðurpartin av hesari bygging.

Tað sæst, at Brunnahúsini hava verið valahús fyrr í tíðini, tí tá vitjan var í bygdini av fólki, sum kanska vóru av tí betra slagnum, varð ofta farið í Brunn at biðja um hús – og var tað altíð leyst og liðugt. Tá varð gingið um dyrnar í ovaru hæddini, og boðið varð inn í bestu stovu.

Nógv jørð hevur hoyrt til húsini – eisini uttanbíggja, eitt nú í Gásadali og við Gjógv. Umframt fjósið vóru fleiri úthús: kvarnarhús, sornhús, hoyggjhús, 3 hjallar, torvhús, 2 neyst og gróthús uttan fyri garðar.

Sum vit kunnu síggja á næstu síðu, hava húsini við Brunn verið mannað við somu ætt í meira enn 300 ár. Hesi fólk hava havt sum livibreyð ta ognarjørð, sum í skiftandi tíðum hevur ligið til húsini. Harumframt fekst nógv úr sjónum og bjørgunum. Hvørja ferð, ið skift hevur verið, er farið burturav; men húsbøndurnir hava dugað væl at fingið fatur í jørðini aftur. Brunnamenninir hava verið hegnismenn og dugað væl at smíða fyri seg og onnur. Tað var ikki av ongum, at næstseinasti Jógvan við Brunn varð kallaður Bøkjarin.

Arkitekturin Søren Vadstrup kannaði og máldi upp húsini við Brunn í 1990 og gjørdi ætlanirnar, sum hava verið grundarlag undir umvælingunum. Hann sigur, at hetta eru eini sermerkt hús í Føroyum, bæði byggilistaliga og húsasøguliga.
Húsini standa í dag nøkulunda, sum tey gjørdu fyri 150 árum síðani (hetta er skrivað í 2019).

Húsini vórðu friðað í 1985 og eru ogn Nólsoyar Fornminnisfelags, ið varð stovnað 6. mai 1984. Tey hava fingið stuðul frá Føroya Fornminnissavni og Føroya Forngripafelag.

***Kelda:*** Anna Juul Thomsen, sambært hesum keldum: Rólant Lenvig, Joen Jacobsen (Jeggi) og Johanne Marie Skylv Hansen: Gamlar Gøtur I (1968) og IV (1973)
***Tekstur:*** Anna Juul Thomsen (heimildarfólk) og Vígdis Bjarnadóttir (skrivari og skrásetari)
***Rættingar – og við ískoytum til tekstin:*** Eyðálvur Gulklett
***Rættlestur:*** Marita Gulklett

Um vit seta húsbóndafólkini við Brunn, sum vit vita navnið á, í navnarað eftir árstølunum, so sær raðið soleiðis út, tá tey hava tikið við ognini:

## Ognarar *við Brunn*

| | | | Tikið við ognini |
|---|---|---|---|
| 1. | Hendrik Jacobsen | ? | ?-1660 |
| 2. | Jacob Hendriksen<br>f. um 1630 | Maren? | 1660-1700 |
| 3. | Hendrik Jacobsen<br>f. um 1676, d. um 1750 | Anne Gabrielsdatter, úr Leirvík<br>f. um 1685, d. um 1755 | 1700-1750 |
| 4. | Jacob Hendriksen<br>f. 1719, d. 02.03.1784 | Maren Pedersdatter, úr Nólsoy<br>f. 1743/1744, d. 01.06.1825 | 1750-1784 |
| 5. | Henric Jacobsen<br>dpt. 14.01.1767, d. 03.12.1796 | Malene Jacobsdatter, av Strondum<br>f. 03.03.1776, d. 01.09.1846 | 1784-1801 |
| 6. | Malene Jacobsdatter<br>f. 03.03.1776, d. 01.09.1846 | * Joen Bertelsen, Vestmanna<br>f. 1769/1770, d. 19.01.1865 | 1801-1822 |
| 7. | Jacob Hendriksen (Gamli Jákup)<br>dpt. 24.01.1796, d. 27.08.1881 | Elsebeth Michelsdatter, úr Gortrastovu, Nólsoy<br>f. 10.02.1799, d. 28.02.1834 | 1822-1848 |
| 8. | Henrich Michael Jacobsen<br>f. 09.11.1823, d. 09.01.1912 | Johanne Jacobine Joensdatter, úr Kvívík<br>f. 24.10.1826, d. 18.12.1908 | 1848-1890 |
| 9. | Joen Jacobsen (Bøkjarin)<br>f. 26.06.1862, d. 15.08.1946 | Ellen Marie Joensen, úr Linustovu, Nólsoy<br>f. 29.11.1868, d. 10.02.1951 | 1890-1951 |
| 10. | ** Henrik Michael Jacobsen<br>f. 04.10.1890, d. 22.07.1914 | ** Susanne Malene Joensen, úr Heiðriksstovu, Nólsoy<br>f. 18.04.1895, d. 18.02.1960 | |
| 11. | Joen Jacobsen (Jeggi)<br>f. 25.01.1911, d. 06.05.1999 | Hedvig Olsen, av Malarenda, Nólsoy<br>f. 14.02.1917, d. 21.12.2005 | 1951-1960 |

* Joen Bertelsen var føddur í Miðvági, men bæði pápin og abbin vóru úr Vestmanna.

** Henrik Michael Jacobsen og Susanne Malene Joensen vóru trúlovað, tá ið hann doyði.

# Ættarliðini, sum eru skorin inn í durastavin *við Brunn*

| | | | Tikið við ognini |
|---|---|---|---|
| 1. | HİS | Hendrik Jacobsen | ?-1660 |
| 2. | İHS | Jacob Hendriksen<br>f. um 1630 | 1660-1700 |
| 3. | HİS | Hendrik Jacobsen<br>f. um 1676, d. um 1750 | 1700-1750 |
| 4. | İHS | Jacob Hendriksen<br>f. 1719, d. 02.03.1784 | 1750-1784 |
| 5. | HMİS | Henric (Michael) Jacobsen<br>dpt. 14.01.1767, d. 03.12.1796 | 1784-1801 |
| | | Malene Jacobsdatter<br>f. 03.03.1776, d. 01.09.1846 | 1801-1822 |
| 6. | İHS | Jacob Hendriksen (Gamli Jákup)<br>dpt. 24.01.1796, d. 27.08.1881 | 1822-1848 |
| 7. | HMİ | Henrich Michael Jacobsen<br>f. 09.11.1823, d. 09.01.1912 | 1848-1890 |
| 8. | İ.İ. | Joen Jacobsen (Bøkjarin)<br>f. 26.06.1862, d. 15.08.1946 | 1890-1951 |

(5.) Hann er doyptur Henric Jacobsen, men hevur óivað verið kallaður Hendrik Mikal. Tað sæst við at hyggja eftir navninum á abbasoninum (7.).

Gamli Jákup (6.) var bara 11 mánaðir gamal, tá ið pápi hansara (5.) doyði. Mamma hansara, Malene Jacobsdatter, giftist uppaftur við Joen Bertelsen, húskalli við Brunn. Tey hava so sitið við ognini, til Gamli Jákup var komin til mans og klárur at taka yvir. Jógvan Bertelsen hevur ikki vilja skrivað navn sítt í durastavin, tí har stóðu bert forbókstavirnir hjá faðir og syni.

Nevnast kann, at í forbókstavunum hjá Gamla Jákupi (6.) İHS, sæst, at hann hevur rættað eitt M til eitt H.

Tað kann eisini síggjast, at Bøkjarin (8.) hevur skorið tað fyrra - og meginpartin av tí seinna I’num ov tætt at teimum ovaru forbókstavunum (HMİ). Hann hevur so varnast mistakið og er byrjaður av nýggjum – longur niðri og meira til høgru.

Sonur Bøkjaran, Henrik Mikal, hevði ikki yvirtikið ognina, tá ið hann doyði bert 23 ára gamal. Av tí sama stendur ei heldur navn hansara í durastavinum.

Tann síðsti Jógvan við Brunn (Jeggi) hevur heldur ikki skorið navn sítt í durastavin. Kanska hevur hann ikki vilja gjørt tað, tí har stóðu, sum áður nevnt, forbókstavirnir hjá faðir og syni, og kom hann at seta sítt navn har, vildi **abbi** hansara, Bøkjarin (8.), staðið framman-/omanfyri.

# Skrá yvir leysar lutir í húsunum *við Brunn*

## Upprunaligir eigarar/gevarar:

| | |
|---|---|
| 100 | Við Brunn |
| 101 | Í Stuttholu |
| 102 | Á Botni |
| 103 | Í Nýggjastovu |
| 104 | Í Kongsstovu |
| 105 | Hjá Krebsi |
| 106 | Á Lambamýru |
| 107 | Á Válinum |
| 108 | Við Nýggjagarð |
| 109 | Marnar á Skúr |
| 110 | Nicolaj Falck |
| 111 | Georg Kjærbo |
| 112 | Neystið hjá Óla Olsen |
| 113 | Ókendur uppruni |
| 114 | Hjá Klæminti |
| 115 | Á Geil |
| 116 | Í Magnusarstovu |
| 117 | Í Verkstað |
| 118 | Í Liða |
| 119 | Maud Wang Hansen |
| 120 | Bjarni Tórgarð Brattaberg |
| 121 | Iris Kjærbo |
| 122 | Nora Tausen |
| 123 | Posthúsið |

# Við Brunn

## Lutir í eystaru stovu (á loftinum)

100 x 243
Lutur: **Prenur**
Um lutin/søga: Eitt hart, og í øðrum endanum, spískt beinastykki – amboð til at gera ella víðka hol við, til dømis at spleysa togendar.
Rúm: Eystara stova

100 x 244
Lutur: **Tubbakstunna**
Rúm: Eystara stova

100 x 245
Lutur: **Spegil við trærammu**
Um lutin/søga: Spegilin hevur havt sítt fasta pláss millum vindeyguni.
Rúm: Eystara stova

100 x 246
Lutur: **Træborð**
Um lutin/søga: Borðið, ið stendur millum vindeyguni, fekk húsið við Brunn frá Hedvig. Hon segði, at tað hoyrdi til húsið. Hartvig Alexander Hansen, sonur Johonnu Mariu Skylv Joensen og Anders Hansen, hevur smíðað tað.
Gevari: Hedvig Jacobsen
Rúm: Eystara stova

100 x 247
Lutur: **Tvær gardinstengur**
Um lutin/søga: Gardinstengurnar eru úr fínt útskornum træi. Tær hevur ein húskallur hjá Anders Hansen gjørt, tá Anders búði á Hesseloynni. Pápi Anders var fyristøðumaður og seinni festari á einum garði har á oynni. Anders stjórnaði hesum garðinum tað síðsta hálvtannað árið fyri pápa sín (frá 1897-1899) av tí, at foreldrini høvdu keypt ein bóndagarð inni á meginlandinum, og sáttmálin um garðin á Hesseloynni ikki var úti um tað mundið.
Johanna Maria Skylv var arbeiðsgenta hjá tí fyrsta vitameistaranum á Borðuni, Edvard Peter Sonne; og hon má hava verið ógvuliga væl umtókt, tí tá ið E. P. Sonne varð fluttur á Hesseloynna tann 1. oktober 1896, flutti Johanna við honum. Á Hesseloynni hitti hon Anders, og tey blivu gift tann 3. desember 1897.
Johanna Maria Skylv var systir Elina Mariu, konu Jógvan Jacobsen við Brunn – vanliga nevndur Bøkjarin.

Anders Hansen var: 1) Vitapassari í Akrabergi frá 1. juli 1912 til og við 30. juni 1917
2) Vitaassistentur á Borðuni frá 1. juli 1917 til og við 30. juni 1924
3) Vitameistari í Mykinesi frá 1. juli 1924 til og við 31. oktober 1940
4) Vitameistari á Borðuni frá 1. november 1940 til og við 31. mars 1945

Gevari: Johanna Maria Skylv
Rúm: Eystara stova

100 x 248
Lutur: **Tveir stólar**
Um lutin/søga: Tveir stólar við útskornum beinum. Stólarnir vóru í húsinum; men teir vóru illa farnir av elli. Hergeir Jacobsen hevur umvælt teir, so teir nú eru sum nýggir.
Rúm: Eystara stova

100 x 249
Lutur: **Sofa**
Um lutin/søga: Sofa við útskornum beinum. Broderaða pólstringin er illa farin. Sofan sær heimagjørd út. Var í húsinum.
Rúm: Eystara stova

100 x 250
Lutur: **Træborð**
Um lutin/søga: Lítið træborð við útskornum beinum og skuffu. Var í húsinum.
Rúm: Eystara stova

100 x 251
Lutur: **Træborð**
Um lutin/søga: Lítið træborð. Hoyrir til húsið.
Hildibjørt Gulklett hevur bundið dúkin, ið liggur á borðinum. (Hildibjørt hevur eisini hekklað báðar gardinurnar, ið hanga fyri vindeygunum á ovasta lofti).
Rúm: Eystara stova

100 x 252
Lutur: **Slagbonkur**
Um lutin/søga: Træbonkur við tveimum rúmum undir setrinum. Brúktur til at sova í. Dýna og koddi vórðu goymd í rúmunum undir setrinum. Hoyrir til húsið.
Rúm: Eystara stova

100 x 253
Lutur: **Skrín**
Um lutin/søga: Træskrín – málað grønt. Hoyrir til húsið.
Rúm: Eystara stova

100 x 254
Lutur: **Lítil slupp**
Um lutin/søga: Mammubeiggi Jógvan (vanliga kallaður Jeggi), Mads Emil, smíðaði sluppina til hansara í 1918. Jeggi vaks upp hjá ommuni og abbanum við Brunn, tá mamma hansara giftist út í Hest. Sluppin var nakað illa farin av tíðarinnar tonn; men Hergeir hevur umvælt hana. Anna Thomina, mostir Jegga, og mamma Onnu Thomsen, gjørdi tey upprunaligu seglini til sluppina; men tey vóru so illa farin, so Anna Thomsen gjørdi nýggj segl.
Rúm: Eystara stova

100 x 255
Lutur: **Lítil træbátur**
Um lutin/søga: Lítil træbátur, sum varð funnin millum grótið í fjósvegginum. Helst er hann goymdur har, tá veggurin varð laðaður. Hergeir hevur gjørt árar, bekkir, tollar, róður og segl til bátin.
Rúm: Eystara stova

100 x 256
Lutur: **Dukka**
Um lutin/søga: Hesa dukkuna fekk Thomina (1901-1960) frá skiparanum á "Ariadnu" úr Onglandi. Enski skiparin var úti í Nólsoy og vitjaði saman við Valdemar Eide, sum var við hesum sama skipi. Hann gisti við Brunn.
Nakað seinni kom skiparin á víkina við skipinum – bert við dukkuni til Thominu. Hetta var í 1905. Thomina var dóttir Elina Mariu og Jógvan við Brunn, og hon var 4 ára gomul, tá ið hon fekk dukkuna. Dukkan varð kallað Ariadna eftir skipinum (kelda: Jeggi 11.05.1997).
Dukkan var heldur illa farin, so Anna hevur hampað um hana – m. a. gjørt henni nýtt hár úr líni.
Rúm: Eystara stova

100 x 257
Lutur: **Silvurkanna og annað**
Um lutin/søga: Silvurkanna, sukurskál og fløtakrúss úr silvuri, og útblástur vasi. Hoyrir til húsið.
Rúm: Eystara stova

100 x 258
Lutur: **Konfirmatiónsmynd**
Um lutin/søga: Konfirmatiónsmynd av Henrik Michael Jacobsen (1890-1914). Myndin varð tikin í 1905. Henrik Michael var pápi Jegga.
Rúm: Eystara stova

100 x 259
Lutur: **Mynd**
Um lutin/søga: Mynd við trærammu. Tekstur: *Gud velsign vort hjem*. Ókendur uppruni.
Rúm: Eystara stova

100 x 260
Lutur: **Bóndapípa**
Rúm: Eystara stova

100 x 261
Lutur: **Sleingipípa**
Um lutin/søga: Sleingipípa – uttan pípustokk.
Rúm: Eystara stova

100 x 262
Lutur: **Mynd**
Um lutin/søga: Mynd í trærammu: *Kristian II i Sønderborg Fængsel*
Rúm: Eystara stova *efter Carl Blochs maleri*

100 x 263
Lutur: **Mynd av skipum**
Um lutin/søga: Mynd av krígsskipum í trærammu. Tekstur: *English and French Fleets*
Rúm: Eystara stova

100 x 264
Lutur: **Áheitan**
Um lutin/søga: Áheitan frá Carl Aage Hilbert, amtmanni, 10. apríl 1940. Træramma. Yvirskriftin er: *Opraab til Befolkningen paa Færøerne.*
Rúm: Eystara stova

100 x 265
Lutur: **Kongsmynd**
Um lutin/søga: Kongsmynd. Tekstur: *Christian X – Konge af Danmark.*
Rúm: Eystara stova

100 x 266
Lutur: **Drotningarmynd**
Um lutin/søga: Drotningarmynd. Tekstur: *Alexandrine – Dronning af Danmark.*
Rúm: Eystara stova

100 x 267
Lutur: **Mynd av Jegga**
Um lutin/søga: Mynd av Jógvani Jacobsen (1911-1999) – vanliga kallaður Jeggi. Hann var síðsti maður, ið búði við Brunn. Avmyndaður í roykstovuni við Brunn. Jákup Andrias Arge, vanliga kallaður ”Pussi” og eisini ”Skilling”, hevur tikið myndina.
Rúm: Eystara stova

100 x 268
Lutur: **Mynd av Hedvig**
Um lutin/søga: Mynd av Hedvig Jacobsen, fødd Olsen (1917-2005). Hon var kona Jegga. Her er hon avmyndað í roykstovuni við Brunn. ”Pussi” var myndamaður.
Rúm: Eystara stova

100 x 269
Lutur: **Mynd av Jógvani og Elini Mariu við Brunn**
Um lutin/søga: Mynd av Jógvani við Brunn (1862-1946) og konu hansara Elini Mariu (1868-1951). Tey eru avmyndað á seiðabergi – hann stendur við tráðu, og hon við eini spann.
Rúm: Eystara stova

100 x 270
Lutur: **Mynd av trimum monnum**
Um lutin/søga: Mynd av Peturi í Abbastovu (1865-1940), Jens Nikláa (1867-1939) og Jógvani við Brunn (1862-1946). Teir sita undir Botnagarði. Jógvan við Brunn – vanliga kallaður Bøkjarin – situr við einum agnkassa í hondini.
Rúm: Eystara stova

100 x 271
Lutur: **Mynd av føroyingum í Noregi**
Um lutin/søga: Mynd av føroyingum á dansiferð í Noregi í 1908. Fleiri kendir menn eru á hesi myndini, m. a. Jóannes Patursson, Hans Andrias Djurhuus, Mikkjal á Ryggi og brøðurnir í Geil. Tríggir nólsoyingar vóru við, og teir vóru:
Hendrik Mikal Jacobsen, við Brunn (1890-1914) (**doyptur: Henrik Michael Jacobsen**)
Mikkjal Hansen, í Magnusarstovu (1890-1914)
Poul Johannus Jacobsen, í Búð (1875-1909)

Hendrik Mikal doyði bert 23 ára gamal. Hann var í vánaligum líkindum, stutt fyri ólavsøku, farin á fleyg suður á Urð. Hann fekk krím, síðan mønusjúku (meningitis) og doyði 22. juli 1914 frá soninum Jegga og mammu Jegga, Súsonnu Malenu (úr Heiðriksstovu).
Sanna í Hesti, sum hon vanliga kallaðist seinni, giftist út í Hest í 1919, og tá flutti Jeggi inn í Brunn, har hann vaks upp hjá ommu og abba sínum.

Mikkjal Hansen doyði um sama aldur sum Hendrik Mikal. Hann sló út longu í 1914.

Poul Johannus Jacobsen í Lon giftist við Josefinu Mariu Hansen í Búð. Poul doyði av tuberklum. Alt í húsinum bleiv brent, tí tey vóru bangin fyri, at smittan sat í lutunum.
Rúm: Eystara stova

100 x 272
Lutur: **Mynd av Jógvani Jacobsen**
Um lutin/søga: Mynd av Jógvani Jacobsen (Bøkjaranum) (1862-1946).
Rúm: Eystara stova

100 x 273
Lutur: **Fýra myndir í rammu**
Um lutin/søga: Fýra myndir í einari trærammu. Á tí eini myndini eru Elin Maria og sonurin Hendrik Mikal – hon situr undir honum. Hinar tríggjar myndirnar eru av honum.
Rúm: Eystara stova

100 x 274
Lutur: **Mynd av Johonnu Mariu Skylv og øðrum**
Um lutin/søga: Mynd í trærammu. Johanna Maria Skylv (systir Elina Mariu), ein kona og tvær gentur.
Rúm: Eystara stova

100 x 275
Lutur: **Mynd**
Um lutin/søga: Mynd úr Danmark. Ein maður og tveir smádreingir.
Rúm: Eystara stova

100 x 276
Lutur: **Mynd**
Um lutin/søga: Mynd úr Danmark av fleiri persónum. Johanna Maria Skylv situr mitt á myndini. Maður hennara, Anders, ið var vitameistari í Føroyum, stendur aftan fyri hana.
Rúm: Eystara stova

100 x 277
Lutur: **Mynd av Gamla Jákupi**
Um lutin/søga: Mynd av Jákupi Henriksen (1796-1881) – eisini kallaður Gamli Jákup. Rund træramma.
Rúm: Eystara stova

Jákup var ein múgvandi maður og dugdi væl at nøra um ognir sínar.
Hann bygdi stovuna niðriundir í 1828. Í 1858 keypti hann eisini komfýrin í húsunum, ið var tann fyrsti, ið kom til Nólsoyar – og eisini ein av teimum fyrstu í Føroyum.
Jákup var við hin lagnutúrin í 1836, tá menn vóru farnir við báti úr Havn til Nólsoyar við timbri at byggja skúlan við. Báturin, ið sleipaði timburflakan, fór runt á fjørðinum, og fimm mans sjólótust. Gamli Jákup sat einsamallur á kjøli í nógvar tímar. At enda fekk hann bjargað sær á land sunnan fyri Argir. Heilt illa á holdum komin fekk hann strítt seg at húsunum hjá Andrasi Mortanssyni á Argjum. Hetta hendi 16. september, og var hann liggjandi á Argjum heilt til 2. februar árið eftir.
Tó livdi hann heilt nógv ár eftir hesa hending.

Kona Jákup, ið var úr Gortrastovu, doyði ung – bert 35 ára gomul. Í koparkrossin, á gravsteini hennara í kirkjugarðinum, er ristað: *Elsebeth Michels Datter, Jacob Hendriksens Hustru, født 10 februar 1799 – Død 28 Februar 1834*

100 x 278
Lutur: **Mynd av verdóttur Gamla Jákup**
Um lutin/søga: Mynd av Johonnu Jacobinu Joensdatter úr Kvívík (1826-1908). Hon var gift við Hendrik Michal Jacobsen (1823-1912), ið var sonur Gamla Jákup. Á myndini situr hon við stokkum í hondum.
Rúm: Eystara stova

100 x 279
Lutur: **Mynd av Thominu**
Um lutin/søga: Mynd av Thominu (1901-1960), Elini Mariu (1868-1951) og Jógvani við Brunn (1862-1946).
Rúm: Eystara stova

100 x 280
Lutur: **Mynd av foreldrunum hjá Jegga**
Um lutin/søga: Hendrik Mikal Jacobsen (1890-1914) og Súsanna Malena Joensen úr Heiðriksstovu (1895-1960), ið seinni varð gift við Hans Frederik Lenvig í Hesti.
Rúm: Eystara stova

100 x 281
Lutur: **Mynd av Thominu**
Um lutin/søga: Mynd av Thominu (1901-1960). Hon var myrkari enn vanligt – bæði í húð og hár – og var ikki frísk, tí hon hevði havt eingilsku sjúkuna, tá ið hon var barn. Hon búði við Brunn saman við foreldrunum og Jegga. Hon var ikki gift og fekk eingi børn.
Rúm: Eystara stova

100 x 282
Lutur: **Mynd av Hendriki Mikal Jacobsen**
Um lutin/søga: Hendrik Mikal (doyptur Henrik Michael) Jacobsen (1890-1914). Rund ramma.
Rúm: Eystara stova

100 x 283
Lutur: **Mynd av konfirmantum**
Um lutin/søga: Mynd av konfirmantum í 1905. Úr Nólsoy síggjast á myndini:
Nr. 3 frá vinstru, aftasta rað, Hendrik Mikal Jacobsen við Brunn.
Nr. 4 frá vinstru, mittasta rað, Oluffa Holm (fødd Jacobsen) á Geil.
Nr. 2 frá vinstru, fremsta rað, Maria Helena Súsanna Thomsen í Geil.
Rúm: Eystara stova

100 x 284
Lutur: **Mynd av konfirmantum**
Um lutin/søga: Mynd av konfirmantum, ið sita við sálmabók í hond.
Rúm: Eystara stova

100 x 285
Lutur: **Kristusmynd**
Um lutin/søga: Kristusmynd í trærammu – Maria við Jesusbarninum. Hoyrir til húsið.
Rúm: Eystara stova

100 x 286
Lutur: **Lítil mynd av Thominu (1901-1960)**
Rúm: Eystara stova

100 x 287
Lutur: **Lítil rund mynd av Johonnu á Malarenda**
Rúm: Eystara stova

100 x 288
Lutur: **Lítil rund mynd av Óla á Malarenda**
Rúm: Eystara stova

100 x 289
Lutur: **Hill úr træi**
Rúm: Eystara stova

100 x 290
Lutur: **Kortílat**
Um lutin/søga: Ílat til kort – útskorið træ. Rúm fyri fýra settum.
Rúm: Eystara stova

100 x 291
Lutur: **Lítil vasi**
Um lutin/søga: Hoyrir til húsið.
Rúm: Eystara stova

100 x 292
Lutur: **Fløska**
Um lutin/søga: Pinkalítil fløska til kamfurdropar. Á seðlinum stendur: *Svane apotheket – Olaf Finsen, Thorshavn – Kamferdraaber.*
Rúm: Eystara stova

100 x 293
Lutur: **Skeið**
Um lutin/søga: Skeið gjørd úr horni. Eitt *T* er skavað í skaftið, so helst hevur Thomina átt skeiðina.
Rúm: Eystara stova

100 x 294
Lutur: **Kumpass**
Um lutin/søga: Kumpass. Hetta er kumpassin, sum Gamli Jákup hevði í einum roðpungi um hálsin, tá hann sat á kjøli í 1836. Av 6 monnum var hann tann einasti, sum kom frá tí við lívinum, tá báturin holvdist á fjørðinum – á veg úr Havn til Nólsoyar við timbri til nýggja skúlan.
Rúm: Eystara stova

100 x 295
Lutur: **Svørð**
Um lutin/søga: Ein av teimum, sum vóru í kongsins tænastu sum hermenn, var Niels Andersen (seinni fekk hann sær Korndal aftrat eftirnavninum). Hann luttók millum annað í sjóbardaganum við Femern í 1644, og seinni var hann í tænastu hjá Christopher Gabel, ið frá 1655-1673 ráddi fyri borgum í Føroyum.
Tá ið Niels kom heimaftur, hevði hann hetta svørðið við sær. Teir, sum vóru í krígginum tá, fingu so nógva jørð, at teir kundu liva av tí restina av lívinum. Jørðin bleiv tikin frá kongsbóndunum. Niels fekk hálvafjórðu mørk her í Nólsoy. Eftir hetta bleiv kann kallaður Stórimaður – og eisini Grøniriddari, av tí hann gekk í grønum búna, tá ið hann kom aftur til landið.
Stórimaður búði í Korndali. Seinni bygt hann sær hús heima í bygdini, ið seinni bleiv nevnd Torlastova. Hann átti ein son, ið doyði av pokunum.
Rúm: Eystara stova

100 x 296
Lutur: **Tvær bendlasneisir**
Um lutin/søga: Tvær bendlasneisir hjá Elini Mariu við Brunn. Bendlasneisin varð nýtt at snara bendlar við – til sátur og desir. Í aðrari bendlasneisini eru skavaðir bókstavirnir: *EI,* og í hinari *EMI*
Rúm: Eystara stova

100 x 297
Lutur: **Skeið gjørd úr horni**
Rúm: Eystara stova

100 x 298
Lutur: **Lítil mynd av ókendum manni**
Rúm: Eystara stova

100 x 299
Lutur: **Tveir vasar**
Um lutin/søga: Tveir grønir vasar við jarnprýði uttaná.
Rúm: Eystara stova

100 x 300
Lutur: **Stór æðrafløska úr glasi**
Rúm: Eystara stova

100 x 301
Lutur: **Lítil brúnur vasi**
Rúm: Eystara stova

100 x 302
Lutur: **Talvborð við tveimum fólkum**
Rúm: Eystara stova

100 x 303
Lutur: **Tvær gassmaskur**
Um lutin/søga: Tvær gassmaskur í hvør sínari eskju. Á aðrari eskjuni stendur: *Thomina Jacobsen, Brunn*, og á hinari: *Elin M Jacobsen*
Rúm: Eystara stova (í kistuni)

100 x 304
Lutur: **Eskja við trimum blekkgløsum, skaft til blekkpennar og ein lítil klokka**
Rúm: Eystara stova

100 x 342
Lutur: **Heiðursportrið**
Um lutin/søga: Lítil málningur av ”ærisportrinum”, tá tað stóð úti við træbrúgv í 1907 (vatnlitir).
Rúm: Eystara stova

## Lutir í vestaru stovu (á loftinum)

Um lutirnar 100 x 305 - 100 x 322 tosaði Anna J. Thomsen við Jegga 19.06.1996.

100 x 305
Lutur: **Trøll í eskju**
Um lutin/søga: Trøll í eskju – avgamalt. Plagdi at standa uppi á einari hill.
Rúm: Vestara stova

100 x 306
Lutur: **Kanón úr træi**
Um lutin/søga: Avgomul trækanón við hjólum – at skjóta svávulpinnar við.
Rúm: Vestara stova

100 x 307
Lutur: **Vekt úr træi við jarnskálum**
Rúm: Vestara stova

100 x 308
Lutur: **Vasi við einum damufiguri**
Rúm: Vestara stova

100 x 309
Lutur: **Brandbilur**
Um lutin/søga: Brandbilur, sum Jeggi fekk frá Rólandi Leif Hansen, soni Johonnu Mariu Skylv, umleið 1918.
Rúm: Vestara stova

100 x 310
Lutur: **Træbátur**
Um lutin/søga: Træbátur, sum Dia á Vertshúsinum hevur gjørt. Hann var systkinabarn pápa Jegga.
Rúm: Vestara stova

100 x 311
Lutur: **Eyskar – elligamalt**
Rúm: Vestara stova

100 x 312
Lutur: **Træskip**
Um lutin/søga: Træskip, sum antin Jeggi ella Dia á Vertshúsinum hevur gjørt.
Rúm: Vestara stova

100 x 313
Lutur: **Træsvørð**
Rúm: Vestara stova

100 x 314
Lutur: **Dukkukommoda**
Um lutin/søga: Dukkukommoda, sum Thomina helst hevur átt.
Rúm: Vestara stova

100 x 315
Lutur: **Bátur við segli**
Um lutin/søga: Bátur við segli, sum Dia á Vertshúsinum hevur gjørt í 1920.
Rúm: Vestara stova

100 x 316
Lutur: **Dukkutrætuflur**
Rúm: Vestara stova

100 x 317
Lutur: **Træmaður**
Um lutin/søga: Træmaður – elligamal. Í rygginum á manninum stendur skavað: *Karl*
Rúm: Vestara stova

100 x 318
Lutur: **Lítil grønur leirvasi**
Rúm: Vestara stova

100 x 319
Lutur: **Leikakópur**
Um lutin/søga: Gamal leikakópur úr jarni – at trekkja upp.
Rúm: Vestara stova

100 x 320
Lutur: **Fløtakrúss úr postalíni og fruktknívur við postalínsskafti**
Rúm: Vestara stova

100 x 321
Lutur**: Oyrnaringar úr gulli**
Rúm: Vestara stova

100 x 322
Lutur: **Leikaskreytvognur**
Um lutin/søga: Elligamal lokaður leikaskreytvognur, sum tveir hestar draga. Plagdi at verða goymdur burtur.
Rúm: Vestara stova

100 x 323
Lutur: **16 talvfólk**
Rúm: Vestara stova

100 x 324
Lutur: **Trækona**
Um lutin/søga: Trækona (dukka). Paul Richard Juel, sonur Johonnu Mariu Skylv, hevur gjørt hana.
Rúm: Vestara stova

100 x 325
Lutur: **Træbátur**
Um lutin/søga: Træbátur, sum Johan Christoffer Larsen (1901-1927), sonur vitameistaran á Borðuni, Christoffer Larsen, gjørdi til Jegga umleið 1916. Hesin Johan Christoffer Larsen bleiv næmingur um borð á Georg Stage í 1917. Seinni sigldi hann sum stýrimaður við skipum hjá reiðaríðnum J. Lauritzen. Hann gekk burtur við *S/S Johanne* (hjá áðurnevnda reiðaríði), tá ið skipið hvarv í Biskeiavíkini umleið 1. apríl 1927.
Rúm: Vestara stova

100 x 326
Lutur: **Pennahúsi**
Um lutin/søga: Pennahúsi í trimum hæddum. Í pennahúsinum eru griffil, eitt heimagjørt viskuleður og pennaskaft við krákupenni. Hetta varð gjørt til Jegga, tá hann fór í skúla.
Rúm: Vestara stova

100 x 327
Lutur: **Gamal hjólbátur úr jarni**
Rúm: Vestara stova

100 x 328
Lutur: **Spann**
Um lutin/søga: Spann úr jarni, sum Thomina hevur átt. Luddi í Dali (1847-1932) hevur gjørt hana.
Rúm: Vestara stova

100 x 329
Lutur: **Skammil**
Um lutin/søga: Pinkalítil gamal skammil úr træi – hevur altíð verið í húsinum.
Rúm: Vestara stova

100 x 330
Lutur: **Linjál (strikufjøl) úr træi – við tummamáti (1 tummi = 2,615 cm)**
Rúm: Vestara stova

100 x 331
Lutur: **Lítil bátur**
Um lutin/søga: Kinesiskur bátur (junka), sum Oluf á Malarenda (1903-1968) hevur keypt, tá ið hann hevur verið í sigling uttanlands.
Rúm: Vestara stova

100 x 332
Lutur: **Bakki við ymiskum íløtum – eitt nú til edik og sinnop**
Rúm: Vestara stova

100 x 333
Lutur: **Rund ljósareyð glasskál við jarnfóti**
Rúm: Vestara stova

100 x 334
Lutur: **Náttlampa**
Um lutin/søga: Grøn náttlampa (oljulampa). Glasið er eitt sindur brotið.
Rúm: Vestara stova

100 x 335
Lutur: **Oljulampa úr klárum glasi**
Rúm: Vestara stova

100 x 336
Lutur: **Mynd av roykstovuni við Brunn**
Um lutin/søga: Vatnlitamynd av roykstovuni í Brunn. Paulina Weishaupt (1900-1959), dóttir Johonnu Mariu Skylv, hevur málað.
Rúm: Vestara stova

100 x 337
Lutur: **Mynd av Sivari (doyptur Jacob Sivert) í Nýggjastovu og Fridu í Heiðriksstovu**
Um lutin/søga: Mynd av Sivari í Nýggjastovu (1900-1960) og Fridu í Heiðriksstovu (1904-1924). Hesi bæði vóru par, men Frida doyði longu 20 ára gomul. Sivar fekk sær ongantíð konu. Hann doyði í Brunn, bert 59 ára gamal. Sivar var komin inn í roykstovuna, meðan Hedvig var í fjósinum. Tá ið Hedvig kom aftur úr fjósinum, fann hon hann sitandi deyðan við avísini Dimmalætting í fanginum.
Rúm: Vestara stova

100 x 338
Lutur: **Stór svørt/hvít mynd av hinari heilagu kvøldmáltíðini**
Rúm: Vestara stova

100 x 339
Lutur: **Kvinna í havsneyð**
Um lutin/søga: Stór mynd av kvinnu í havsneyð, ið hongur uppi í einum krossi.
Rúm: Vestara stova

100 x 340
Lutur: **Mynd av Jesusi**
Um lutin/søga: Stór mynd í trærammu av Jesusi, tá hann varð doyptur av Jóhannes doypara.
Rúm: Vestara stova

100 x 341
Lutur: **Mynd av smádreingi**
Um lutin/søga: Stór mynd í trærammu av smádreingi í lítlum báti og verndareingli hansara.
Rúm: Vestara stova

100 x 343
Lutur: **Lítið træskrín**
Rúm: Vestara stova

100 x 344
Lutur: **Bingospæl**
Um lutin/søga: Eskja við ”brikkum” og 18 plátum.
Rúm: Vestara stova

100 x 345
Lutur: **Brún træsong**
Um lutin/søga: Stór brún træsong, ið kann hálast út til dupultsong.
Rúm: Vestara stova

100 x 346
Lutur: **Reyð træsong**
Um lutin/søga: Stór reyð træsong, ið kann hálast út til dupultsong.
Rúm: Vestara stova

100 x 347
Lutur: **Tvær buksupressur**
Um lutin/søga: Tvær pressur at seta í buksubrøkur.
Rúm: Vestara stova

100 x 348
Lutur: **Vevskammil úr træi**
Rúm: Vestara stova

100 x 349
Lutur: **Lítil Kista**
Um lutin/søga: Lítil trækista – málað reyðbrún. Lokið, ið er gjørt av nýggjum, er ómálað.
Rúm: Vestara stova

100 x 350
Lutur: **Stór kista – málað reyðbrún**
Rúm: Vestara stova

100 x 351
Lutur: **Útróðrarskrín**
Rúm: Vestara stova

100 x 352
Lutur: **Stór kista – málað blá**
Rúm: Vestara stova

100 x 353
Lutur: **Spegil**
Gevari: Malan Hansen
Fyrrverandi eigari: Við Brunn
Um lutin/søga: Spegil við gullrammu. Jákup á Skúr hevur arvað hann úr Brunn, og tí hevur spegilin verið í familjuni hjá Maluni.
Rúm: Vestara stova

100 x 354
Lutur: **Klokka**
Um lutin/søga: Klokka at seta á borð ella hill. Slær hvønn hálva tíma. Útskorið træ.
Rúm: Vestara stova

100 x 355
Lutur: **Oljulampa**
Um lutin/søga: Lampan er úr grønum glasi. Glasið omaná er smalt og klárt.
Rúm: Vestara stova

100 x 356
Lutur: **Oljulampa**
Um lutin/søga: Oljulampa úr grønum glasi. Glasið omaná manglar.
Rúm: Vestara stova

100 x 357
Lutur: **Oljulampa**
Um lutin/søga: Oljulampa úr klárum glasi. Glasið omaná er brotið.
Rúm: Vestara stova

100 x 358
Lutur: **Bókahill úr træi**
Rúm: Vestara stova

100 x 359
Lutur: **Tríggjar grønar glaskúlur**
Rúm: Vestara stova (í bláu kistuni)

100 x 360
Lutur: **Ein floyta úr jarni**
Gevari: Jens-Kjeld Jensen
Um lutin/søga: Jens-Kjeld Jensen fann floytuna suðuri á Urð.
Rúm: Vestara stova

100 x 361
Lutur: **11 horn av neyti**
Rúm: Vestara stova (í reyðu kistuni)

100 x 362
Lutur: **2 krúthorn av neyti**
Rúm: Vestara stova (í reyðu kistuni)

100 x 363
Lutur: **4 krúthorn av neyti**
Rúm: Vestara stova (í reyðu kistuni)

100 x 364
Lutur: **Oysa**
Rúm: Vestara stova (í bláu kistuni)

100 x 365
Lutur: **Saltílat**
Rúm: Vestara stova (í bláu kistuni)

100 x 366
Lutur: **NIOGT-merki**
Um lutin/søga: NIOGT-merki at heingja upp á veggin. Á merkinum stendur: *Jul 1929*
Rúm: Vestara stova

100 x 367
Lutur: **Knaggarað**
Um lutin/søga: Eitt knaggarað at heingja upp á veggin. Tríggir knaggar úr træi.
Rúm: Vestara stova (í bláu kistuni)

100 x 368
Lutur: **Ein tollur til træbát**
Rúm: Vestara stova (í reyðu kistuni)

100 x 369
Lutur: **Trækassi**
Um lutin/søga: Ein trækassi við fýra rúmum.
Rúm: Vestara stova (í reyðu kistuni)

# Lutir í kamarinum hjá Lovisu

Søga: Susanne Louise Poulsen (f. 08.04.1848, d. 15.01.1932), vanliga nevnd Lovisa. Hon var arbeiðskona við Brunn alt sítt lív.

Pápi hennara kom til Nólsoyar úr Havn við henni, tá hon var 14 ára gomul. Hann kom í Brunn og spurdi, um tey vildu taka sær av henni, tí eldur hevði verið í húsinum hjá teimum, og tey høvdu fleiri børn.

Tá nólsoyingar spurdu hann, um tað var stórur skaði av eldinum, svaraði hann, at skaðin var ikki so stórur – bara eitt barn doyði; tað ringasta var tó, at ”postiljan” (lestrabókin) brann.

Lovisa svav í lítla kamarinum, sum kaminan gongur upp ígjøgnum. Hon sat ofta á stabbanum við komfýrin í roykstovuni. Lovisa varð bæði blind og deyv á gamalsaldrinum.

Ein dagin, Lovisa, væl við aldur, situr við komfýrin, ansar hon ikki eftir, at kettan er farin inn í bakarovnin at verma seg. Lovisa letur bakarovnshurðina aftur og leggur aftur at eldinum í komfýrinum. So hóast kettan mjarraði og illa læt, hoyrdi Lovisa hana ikki, við tí úrsliti, at kettan lá deyð í bakarovninum.

Ein dagin, Lovisa á yngri árum var uppi á Brekkum og goymdi at neytum, sær hon sjey svanir sita á einari tjørn. So sær hon ein mann koma við byrsu, sum ætlar sær at skjóta teir; men Lovisa rekur svanirnar á flog. Sagt er frá, at tá Lovisa fór til gravar, flugu sjey svanir yvir grøvini hjá henni. (heimildarfólk: Anna Juul Thomsen)

100 x 370
Lutur: **Hvítt fyriklæði – at nýta til fínt brúk**
Gevari: Amalia Danielsen
Fyrrverandi eigari: Við Brunn
Rúm: Kamarið hjá Lovisu

100 x 371
Lutur: **Pissifløska til mannfólk**
Um lutin/søga: Fløskan er einaferð brotnað og er tí klinkað saman.
Rúm: Kamarið hjá Lovisu

100 x 372
Lutur: **Náttpottur**
Gevari: Amalia Danielsen
Fyrrverandi eigari: Við Brunn
Rúm: Kamarið hjá Lovisu

100 x 373
Lutur: **Mynd**
Um lutin/søga: Ein mynd í trærammu. Vatn í eini skóg. Á myndini stendur: *Eftermiddagssol i mosen. Efter maleri af Fr. Winther*
Rúm: Kamarið hjá Lovisu

100 x 374
Lutur: **Mynd**
Um lutin/søga: Ein mynd í trærammu. Blómur. Á myndini stendur: *En efteraarsbuket. Efter maleri af Frk. A. Dohlmann*
Rúm: Kamarið hjá Lovisu

100 x 375
Lutur: **Lýsilampa**
Um lutin/søga: Ein lýsilampa frá 1914. Lýsilampur vórðu nýttar undir fyrra krígnum (1914-1918), tí tá fekst einki petrolium.
Rúm: Kamarið hjá Lovisu

100 x 376
Lutur: **Eitt kuffert úr træi**
Rúm: Kamarið hjá Lovisu

100 x 377
Lutur: **Fleiri fløskur og ein krukka**
Um lutin/søga: Hesar hava verið nýttar til medisin og annað.
Rúm: Kamarið hjá Lovisu

100 x 378
Lutur: **Irækassi við gomlum amboðum og sprekum**
Rúm: Kamarið hjá Lovisu

100 x 379
Lutur: **Songin hjá Lovisu**
Rúm: Kamarið hjá Lovisu

100 x 380
Lutur: **Træhamari**
Rúm: Kamarið hjá Lovisu

100 x 381
Lutur: **Trælisti**
Um lutin/søga: Trælisti við holi í. Óvist er, hvat ið hann hevur verið brúktur til.
Rúm: Kamarið hjá Lovisu

100 x 382
Lutur: **Útskorin trælisti**
Um lutin/søga: Útskorin trælisti (at skrúva inn í veggin) – at heingja handklæði og annað uppá.
Rúm: Kamarið hjá Lovisu

## Lutir í spískamarinum

100 x 383
Lutur: **Breyðskerari**
Rúm: Spískamarið

100 x 384
Lutur: **Kjøtmaskina**
Um lutin/søga: Kjøtmaskina frá 1895. Hetta er tann fyrsta kjøtmaskinan, ið kom til Nólsoyar.
Rúm: Spískamarið

100 x 385
Lutur: **Tvær træspannir**
Um lutin/søga: Tvær træspannir nýttar til ok. Ok var eitt passaliga langt stykki av træi, sum ein hevði liggjandi um herðarnar, tá vatn skuldi berast. Træspannirnar vórðu so hongdar í okið – ein í hvønn enda.
Rúm: Spískamarið

100 x 386
Lutur: **Petroliumskókari**
Rúm: Spískamarið

100 x 387
Lutur: **Eltifat úr leiri við træloki**
Rúm: Spískamarið

100 x 388
Lutur: **Kaffikanna**
Um lutin/søga: Myrkablá kaffikanna. Hon er glarað, men tíverri er botnurin rustaður burtur.
Rúm: Spískamarið

100 x 389
Lutur: **Tveir ketlar**
Um lutin/søga: Annar er sera stórur – bláur og glaraður. Hin er minni og illa rustaður.
Rúm: Spískamarið

100 x 390
Lutur: **Kassi úr jarni**
Um lutin/søga: Kassi, sum keks hava verið í. Á kassanum stendur: *Chocolate Shortcakes – Bisquits*
Rúm: Spískamarið

100 x 391
Lutur: **Brún leirkrukka**
Rúm: Spískamarið

100 x 392
Lutur: **Trý glarað føt og fýra úr leiri**
Rúm: Spískamarið

100 x 393
Lutur: **Eitt ílat, ið hevur verið partur av einari oysu**
Rúm: Spískamarið

100 x 395
Lutur: **Útskerar til kakur**
Um lutin/søga: 10 smáir formar (í ymsum mynstrum) til smákakur og 6 formar (í ymsum mynstrum) til kakur (muffins).
Rúm: Spískamarið

100 x 396
Lutur: **7 ljósabrúnar leirkrukkur – ymiskar støddir**
Rúm: Spískamarið

100 x 397
Lutur: **Ostaformur úr træi**
Rúm: Spískamarið

100 x 398
Lutur: **Tveir stampar úr træi**
Um lutin/søga: *EJ* stendur undir báðum botnunum á teimum. Brúktir til mjólk og annað.
Rúm: Spískamarið

100 x 399
Lutur: **Fat úr leiri**
Rúm: Spískamarið

100 x 400
Lutur: **Lítið lagkøkufat úr glasi**
Rúm: Spískamarið

100 x 401
Lutur: **Mjólkarkanna og eitt lok til sukurskál**
Um lutin/søga: Báðir lutirnir hava reyðar strípur
Rúm: Spískamarið

100 x 402
Lutur: **Hvít skál**
Rúm: Spískamarið

100 x 403
Lutur: **Mjólkarkanna – við brúnum myndevni á**
Rúm: Spískamarið

100 x 404
Lutur: **Ein mjólkarkanna – mussilinmálað**
Rúm: Spískamarið

100 x 405
Lutur: **Mjólkarkanna úr leiri – appilsingul og grøn**
Rúm: Spískamarið

100 x 406
Lutur: **Ein spølkumma við málaðum borda**
Rúm: Spískamarið

100 x 407
Lutur: **Eitt rómastampafat**
Rúm: Spískamarið

100 x 408
Lutur: **Eitt leirfat við einari honk**
Rúm: Spískamarið

100 x 409
Lutur: **Eitt leirfat at stoyta av**
Rúm: Spískamarið

100 x 410
Lutur: **Eitt lítið fat (við glasing)**
Rúm: Spískamarið

100 x 411
Lutur: **Ein koppur við mynd av hurð og gluggum í húsagrund**
Rúm: Spískamarið

100 x 412
Lutur: **Tvey saltíløt úr glasi**
Rúm: Spískamarið

100 x 413
Lutur: **Ein lítil blá fløska**
Um lutin/søga: Tað sær út, sum proppur við skrúvugangi einaferð hevur hoyrt til.
Rúm: Spískamarið

100 x 414
Lutur: **Ein oysa við svørtum skafti – rustað framman**
Rúm: Spískamarið

100 x 415
Lutur: **Eitt eldfast ílat við loki – lakkað brúnt**
Rúm: Spískamarið

100 x 416
Lutur: **Glaskrukka – fýrkantað**
Rúm: Spískamarið

100 x 417
Lutur: **Spølkumma við bláum blómum**
Rúm: Spískamarið

100 x 418
Lutur: **Lítil spølkumma við loki**
Rúm: Spískamarið

100 x 419
Lutur: **Koppur við tveimum skálum og ein desserttallerkur**
Um lutin/søga: Myndir av blómum eru á koppinum og báðum skálunum.
Rúm: Spískamarið

100 x 420
Lutur: **Mjólkarkrúss – hvítt og blátt**
Rúm: Spískamarið

100 x 421
Lutur: **Lítil spølkumma – petti brotið úr síðuni**
Rúm: Spískamarið

100 x 422
Lutur: **5 eggjabikør**
Rúm: Spískamarið

100 x 423
Lutur: **Fýra knívar – rustaðir**
Rúm: Spískamarið

100 x 424
Lutur: **Tveir trævindslar (trillur)**
Rúm: Spískamarið

100 x 425
Lutur: **Krukka**
Um lutin/søga: Krukka við loki – bæði úr klárum glasi. Á krukkuni stendur: *Kastrup.* Á lokinum: *Weck*
Rúm: Spískamarið

100 x 426
Lutur: **Glasfløska úr klárum glasi – við proppi at skrúva á**
Rúm: Spískamarið

100 x 427
Lutur: **Mjólkarkanna úr klárum glasi**
Rúm: Spískamarið

100 x 428
Lutur: **Fýrkantað jarnblikk við loki**
Rúm: Spískamarið

100 x 429
Lutur: **Skál úr bláum glasi – brotin**
Rúm: Spískamarið

100 x 430
Lutur: **Klárt lampuglas**
Rúm: Spískamarið

100 x 431
Lutur: **Fat og smørskál í einum**
Um lutin/søga: Brotið fat til viðskera – úr brúnum glasi. Føst mittá er smørskál við loki.
Rúm: Spískamarið

100 x 432
Lutur: **Lítil sápuskál við ymiskum lutum til at seyma við**
Um lutin/søga: Millum aðrar lutir eru: ein prenur, fingurbolli, sprettiknívur og hekklinál.
Rúm: Spískamarið

100 x 433
Lutur: **Lítil klár glaskrukka**
Rúm: Spískamarið

## Lutir í roykstovuni

100 x 394
Lutur: **Borðbúnaður**
Um lutin/søga: Hetta fevnir um 11 súpiskeiðir, 13 gaflar og 6 teskeiðir – úr ymiskum tilfari.
Rúm: Roykstovan (á køksborðinum)

100 x 434
Lutur: **Hvít oysa**
Rúm: Roykstovan

100 x 435
Lutur: **Rekkja til tallerkar**
Rúm: Roykstovan

100 x 436
Lutur: **9 tallerkar**
Rúm: Roykstovan

100 x 437
Lutur: **Lítil djúp træsleiv við króki á endanum**
Rúm: Roykstovan

100 x 438
Lutur: **Træsleiv við króki á endanum**
Rúm: Roykstovan

100 x 439
Lutur: **Træsleiv við króki á endanum**
Rúm: Roykstovan

100 x 610
Lutur: **Lítil træsleiv (ongan krók á endanum)**
Rúm: Roykstovan

100 x 611
Lutur: **Stutt træsleiv við parti av króki á endanum**
Rúm: Roykstovan

100 x 612
Lutur: **Ein svørt træoysa**
Rúm: Roykstovan

100 x 613
Lutur: **Naddatvørra (greytarsneis) úr træi (miðalstødd)**
Rúm: Roykstovan

100 x 614
Lutur: **Naddatvørra úr træi (stór)**
Rúm: Roykstovan

100 x 615
Lutur: **Naddatvørra úr træi (lítil)**
Rúm: Roykstovan

100 x 616
Lutur: **Eitt tummamát úr træi  (1 tummi = 2,615 cm)**
Rúm: Roykstovan

100 x 617
Lutur: **Eitt skeribretti**
Rúm: Roykstovan

100 x 618
Lutur: **6 koppar (ein við bláari rond)**
Rúm: Roykstovan

100 x 619
Lutur: **7 lyklar til hvølpalás**
Um lutin/søga: Ein er úr jarni og restin úr træi
Rúm: Roykstovan

100 x 620
Lutur: **Tvey amboð við træskafti – at bora við**
Rúm: Roykstovan

100 x 621
Lutur: **41 træstokkar**
Rúm: Roykstovan

100 x 622
Lutur: **Pennaskaft úr træi**
Rúm: Roykstovan

100 x 623
Lutur: **Ein síla – við bláari glasing**
Rúm: Roykstovan

100 x 624
Lutur: **Sodaílat**
Um lutin/søga: Ílat til sodu – við bláari glasing. Á ílatinum stendur skrivað: *Soda*
Rúm: Roykstovan

100 x 625
Lutur: **Lítil spegil**
Rúm: Roykstovan

100 x 626
Lutur: **Skál til hondsápu – við bláari glasing**
Rúm: Roykstovan

100 x 627
Lutur: **Sápuílat**
Um lutin/søga: Ílat til sápu við bláari glasing. Á ílatinum stendur skrivað: *Sæbe*
Rúm: Roykstovan

100 x 628
Lutur: **Liturmál**
Um lutin/søga: Liturmál við bláari glasing. Á liturmálinum stendur skrivað: *1 ltr*
Rúm: Roykstovan

100 x 629
Lutur: **Skeribretti at heingja upp**
Rúm: Roykstovan

100 x 630
Lutur: **Mjólkarsíla úr træi**
Rúm: Roykstovan

100 x 631
Lutur: **Lítil hill úr træi**
Rúm: Roykstovan

100 x 632
Lutur: **Lítil rund bust við træskafti**
Rúm: Roykstovan

100 x 633
Lutur: **Rakikustur**
Rúm: Roykstovan

100 x 634
Lutur: **Petroliumslampa**
Gevari: Møguliga er hendan komin frá Marthu á Malarenda.
Um lutin/søga: Hvít petroliumslampa við bláum mynstri.
Rúm: Roykstovan

100 x 635
Lutur: **Tesíla**
Rúm: Roykstovan

100 x 636
Lutur: **Spølkumma**
Um lutin/søga: Hvít spølkumma við grønum og reyðum mynstri – skarðað.
Rúm: Roykstovan

100 x 637
Lutur: **Spølkumma**
Um lutin/søga: Hvít spølkumma við brúnum, grønum, reyðum og bláum mynstri – skarðað.
Rúm: Roykstovan

100 x 638
Lutur: **Primus**
Rúm: Roykstovan

100 x 639
Lutur: **Ein lampupussari**
Rúm: Roykstovan

100 x 640
Lutur: **Lykil**
Um lutin/søga: Ein lykil við spjaldri á. Á spjaldrinum stendur *HMIS* fyri Hendrik Michal Jacobsen.
Rúm: Roykstovan

100 x 441
Lutur: **Tveir stórir pottar til komfýrin**
Rúm: Roykstovan (undir borðinum – við síðuna av vaskinum)

100 x 442
Lutur: **Uppvaskibust úr træi**
Rúm: Roykstovan

100 x 443
Lutur: **Kaffikvørn – til at mala kaffi við**
Rúm: Roykstovan

100 x 444
Lutur: **Ein rundur træhamari**
Rúm: Roykstovan

100 x 445
Lutur: **Ein fýrkantaður træhamari**
Rúm: Roykstovan

100 x 446
Lutur: **Høggujarn – uttan skaft**
Rúm: Roykstovan

100 x 447
Lutur: **Træskál – brákað**
Rúm: Roykstovan

100 x 448
Lutur: **Ein kannubari**
Um lutin/søga: Ein kannubari úr træi. Kannubari er gamalt rúmmál (til t. d. korn ella mjøl). Ein kannubari er tríggir pottar. 48 kannubarar fóru í tunnuna.
Rúm: Roykstovan

100 x 449
Lutur: **Tvey sáld**
Um lutin/søga: Tvey sáld úr træi og jarni. Tá kornið varð malið, skuldi tað sáldast fyri at fáa tað fína mjølið frá.
Rúm: Roykstovan

100 x 450
Lutur: **Ein eltifjøl úr træi – til drýl og breyð**
Rúm: Roykstovan

100 x 451
Lutur: **Ein bakki**
Fyrrverandi eigari: Anna Jacobsen (hjá Hanna í Króki) kom við hesum bakkanum.
Um lutin/søga: Ein bakki úr træi. Er bygdur og útskorin eitt sindur sjáldsamt, men óvist er, hvørjum endamáli bakkin hevur tænt.
Rúm: Roykstovan

100 x 452
Lutur: **Kvørn**
Um lutin/søga: Stór kvørn. Stóð fyrr í einum úthúsi – einum kvarnarhúsi, har kornið varð malið. Stóð í nøkur ár í Heiðriksstovu, síðani stóð hon úti eitt tíðarskeið, og nú er hon so í Brunn.
Rúm: Roykstovan

100 x 453
Lutur: **Klokka at heingja upp á veggin**
Um lutin/søga: Lykil er til at trekkja klokkuna upp við.
Rúm: Roykstovan

100 x 454
Luitur: **Petroliumslampa at heingja upp á veggin**
Rúm: Roykstovan

100 x 455
Lutur: **Strúkijarn**
Um lutin/søga: Eitt strúkijarn til at leggja ein stein inní. Handtakið er úr træi. Steinurin varð hitaður í eldinum og síðani lagdur inn í strúkijarnið.
Rúm: Roykstovan

100 x 456
Lutur: **Trý strúkijørn**
Um lutin/søga: 3 strúkijørn við einum leysum handtaki. Handtakið er úr træi og fest upp á eitt av strúkijørnunum. Møguliga komin úr húsinum á Malarenda.
Rúm: Roykstovan

100 x 457
Lutur: **Fýra strúkijørn**
Um lutin/søga: 4 strúkijørn við træhandtaki – eitt av handtøkunum er brotnað av. Okkurt av strúkijørnunum er kanska komið úr húsinum á Malarenda.
Rúm: Roykstovan

100 x 461
Lutur: **Kaffikanna**
Um lutin/søga: Kaffikanna (Madam Blå). Óvist er, hvaðan hon stavar.
Rúm: Roykstovan

100 x 462
Lutur: **Tekanna**
Um lutin/søga: Tekanna (Madam Blå). Óvist er, hvaðan hon stavar.
Rúm: Roykstovan

100 x 463
Lutur: **Stórur ketil við træloki**
Rúm: Roykstovan

100 x 464
Lutur: **Komfýrur**
Um lutin/søga: Gamli Jákup keypti hendan komfýrin í 1858, og var hesin tann fyrsti komfýrur í Nólsoy – og eisini ein av teimum fyrstu í Føroyum. Tað komu tríggir komfýrar til Føroya í 1858: hesin til Brunn, ein til Kirkjubøar og ein til Norðoyggjar, sum er burtur í dag. Komfýrarnir vóru eitt stórt framstig í Føroyum tá. Áðrenn høvdu tey bara eldstað og opna grúgv. Gamli Jákup plagdi at kalla komfýrin fyri kókimaskinuna.
Til samanberingar kann sigast, at fyrstu komfýrarnir komu til Danmarkar í 1840-árunum.
Rúm: Roykstovan

100 x 465
Lutur: **Stabbi**
Um lutin/søga: Stabbin er av royðrini, sum bleiv funnin eystan fyri Nólsoynna í 1895. Ziska Hansen var farin niðan í Bø at sláa, og hann hevði altíð kikaran við sær. Komin niðan, setur hann kikaran fyri eygað og sær ein stóran reka í havsbrúnni. Hann sigur bygdarmonnum sínum frá hesum. Í fyrstani hildu fleiri, at hetta var eitt hvølvt skip; men tá ið teir koma rógvandi nærri, síggja teir, at tað er ein deyður hvalur.
Morgunin eftir, at teir eftir tógvið stríð høvdu sleipað hvalin inn á víkina í Nólsoy, kom ein hvalabátur til Nólsoyar við Alberti Grøn á odda og gjørdi krav upp á hvalin. Grøn, ið var fyristøðumaður á hvalastøðini á Gjánoyri, helt seg hava einkarætt upp á alla hvalaveiðu undir Føroyum.
Tað bleiv sak burtur úr tí, og dómurin bleiv tann, at nólsoyingar kundu fáa hvalin fyri 400 kr. Pengarnar læntu teir frá Andersen handilsmanni í Vágsbotni.
Hvalurin var hálvrotin, tá sakin var liðug; men teir fingu smeltað lýsið úr honum, sum teir seldu. Tá ið tvøstið var farið uttan av beinaraðnum, skóru teir ryggin sundur og býttu geislarnar millum sín, sum síðan vórðu brúktir í húsunum til sessir, at buka fisk á og annað.
Tá ið kongsvitjan var í Føroyum í 1907 av Fríðriki 8. – og hann eisini vitjaði úti í Nólsoy – var kjálkabeinið av hvalinum sett upp úti við træbrúgv sum eitt heiðursportur.

Royður er tað størsta núlivandi djórið. Hon kann blíva upp til 33 metrar long og viga upp í móti 200 tonsum. Hetta er so mikið sum 19 fílar.
Rúm: Roykstovan

100 x 466
Lutur: **Rokkabonkur**
Um lutin/søga: Rokkabonkur varð brúktur, tá spunnið varð. Lovisa, ið var arbeiðsgenta við Brunn alt sítt lív, átti bonkin.
Rúm: Roykstovan

100 x 467
Lutur: **Stólur**
Um lutin/søga: Stólur úr træi, sum Thomina átti. Pólstringin var øll slitin, so Anna J. Thomsen hevur gjørt nýggja pólstring til stólin.
Rúm: Roykstovan

100 x 468
Lutur: **Útróðrarskrín – málað brúnt**
Rúm: Roykstovan

100 x 469
Lutur: **Træílat**
Um lutin/søga: Træílat, ið varð brúkt, tá tey ferðaðust fyrr. Bygt sum ein tunna við gjørðum, og við træloki við serligari læsimekanismu. Lásið riggar tó ikki heilt, tí okkurt er brotið av tí.
Rúm: Roykstovan

100 x 470
Lutur: **Meyukista**
Um lutin/søga: Anna Gabrielsdatter hevði kistuna við sær, tá hon giftist til Nólsoyar við Hendriki við Brunn. Anna var ættað niður frá Gabriel Torlufsen, sum var próstur á Nesi umleið 1614.
Anna og Hendrikur áttu trý børn: Jákup, Gabriel og Marin – vanliga nevnd Meya. Haðani kemur navnið Meyukista. Meya var abbasystir Gamla Jákup. Hon varð fødd í 1717 og doyði 08.02.1807, 90 ára gomul.
Rúm: Roykstovan

100 x 471
Lutur: **Strikumát**
Um lutin/søga: Strikumát var eitt amboð til at gera beinar strikur við – til dømis at saga eftir. Í strikumátið er skorið: *II* (kanska Jógvan Jacobsen).
Rúm: Roykstovan

100 x 472
Lutur: **Tveir kílar at seta niður í lás**
Rúm: Roykstovan

100 x 473
Lutur: **Tvey amboð**
Um lutin/søga: Tvey træskøft við rustaðum jarnblaði á. Sær út sum knívar.
Rúm: Roykstovan

100 x 474
Lutur: **Bendlasneis**
Rúm: Roykstovan

100 x 475
Lutur: **Tvey krúthorn**
Um lutin/søga: Tvey krúthorn. *PIT* er skorið í annað.
Rúm: Roykstovan

100 x 476
Lutur: **Tveir stoypiformar**
Um lutin/søga: Tveir lítlir stoypiformar. Brúktir til at stoypa pilkar ella líknandi við.
Rúm: Roykstovan

100 x 477
Lutur: **Tekanna**
Um lutin/søga: Tekanna (Madam Blå) – eitt sindur rustað og einki lok.
Rúm: Roykstovan

100 x 478
Lutur: **Ein primus**
Rúm: Roykstovan

100 x 479
Lutur: **Ein leðurpungur**
Rúm: Roykstovan

100 x 480
Lutur: **34 heldir í einum bandi + 1 leys og 1 onnur hongur í einum reipi**
Rúm: Roykstovan

100 x 481
Lutur: **3 træskamlar**
Rúm: Roykstovan

100 x 482
Lutur: **Træstólur**
Rúm: Roykstovan

100 x 483
Lutur: **Træborð**
Rúm: Roykstovan

## Lutir í stovuni

100 x 484
Lutur: **4 bismarar**
Rúm: Stovan

100 x 485
Lutur: **Borðklombur**
Um lutin/søga: 5 long - og 3 stutt klombur. Amboð at halda borðunum saman á báti, meðan klinkað verður.
Rúm: Stovan

100 x 486
Lutur: **Stavur úr træi**
Rúm: Stovan

100 x 487
Lutur: **Vaðmalstræ**
Um lutin/søga: Vaðmalstræ var nýtt til at rulla vaðmal uppá fyri at slætta tað. Inn í træið er skorið: *EJ* (Elin Maria Joensen).
Rúm: Stovan

100 x 488
Lutur: **Amboð at skoyta rennistrong við**
Rúm: Stovan

100 x 489
Lutur: **Amboð til rennistrong**
Um lutin/søga: Millumbukkur, sum rennistrongurin lá um.
Rúm: Stovan

100 x 492
Lutur: **Tvey hvalvákn**
Um lutin/søga: Hvalváknini hoyrdu til bátin, ið nevndist *Risin*. Brunna- og Skúramenninir áttu bátin saman. *IIB* er skorið í træið (Jógvan Jacobsen Brunn).
Rúm: Stovan

100 x 493
Lutur: **Rifla**
Um lutin/søga: Forløðari (framløðingur) frá 1. Slesvíkska Krígnum (1848-1850) millum Danmark og Týskland (sigst at vera brúkt í bardaganum við Dybbøl, 5. juni 1848). Keypt á uppboðssølu í Vágsbotni fyri 5 kr.
Rúm: Stovan

100 x 494
Lutur: **Høglbyrsa**
Um lutin/søga: Hetta er tann gamla byrsan hjá Bøkjaranum, sum hann fekk frá einum donskum landmátara. Tað vóru fleiri danskir landmátarar, ið gjørdu landmátingar í Føroyum árini 1895-1898. Tá ið so mátingarnar hava verið gjørdar úti í Nólsoy, hevur hesin danski landmátarin búð við Brunn. Óivað hevur Bøkjarin fingið byrsuna frá honum, sum tøkk fyri innivist.
Byrsan varð brúkt til at skjóta fugl við.
Rúm: Stovan

100 x 495
Lutur: **Tveir laðstokkar**
Um lutin/søga: Brúktir til at løða riflur og byrsur við.
Rúm: Stovan

100 x 496
Lutur: **Vaðmalstræ**
Um lutin/Søga: Eitt vaðmalstræ varð nýtt til at rulla vaðmal uppá, tá tey høvdu vovið.
Rúm: Stovan

100 x 497
Lutur: **Spennitræ til vev**
Rúm: Stovan

100 x 498
Lutur: **Skjúttil til vev**
Rúm: Stovan

100 x 499
Lutur: **Syllutræ**
Rúm: Stovan

100 x 500
Lutur: **Tuflumynstur**
Um lutin/søga: Tuflumynstur úr træi í ymiskum støddum – til børn og vaksin. 11 heil og 1 brotið.
Rúm: Stovan

100 x 501
Lutur: **Tvey mjólkarmál**
Rúm: Stovan

100 x  502
Lutur: **Tvær bendlasneisir til sátur**
Rúm: Stovan

100 x 503
Lutur: **Ein træslíðri**
Rúm: Stovan

100 x 504
Lutur: **Ein stórur holuhamari**
Rúm: Stovan

100 x 505
Lutur: **Sóknarongul**
Rúm: Stovan

100 x 506
Lutur: **Skutil**
Rúm: Stovan

100 x 507
Lutur: **Ein trækrani - møguliga til tunnur**
Rúm: Stovan

100 x 508
Lutur: **Krokkkeppur**
Rúm: Stovan

100 x 509
Lutur: **Lodd til smáfiskasnøri**
Rúm: Stovan

100 x 510
Lutur: **8 heldir**
Um lutin/søga: 7 vanligar heldir og 1 stór.
Rúm: Stovan

100 x 511
Lutur: **Goggari (goggur) – útskorið træskaft**
Rúm: Stovan

100 x 512
Lutur: **Tríggir lutir til ein garnvindara**
Rúm: Stovan

100 x 513
Lutur: **Fløska við høglum í**
Rúm: Stovan

100 x 514
Lutur: **Krútfløska**
Um lutin/søga: Reyð krútfløska. Á navnseðlinum: *Curtis's and Harvey's gunpowder, Hounslow and London.*
Rúm: Stovan

100 x 515
Lutur: **Fýra neytahorn**
Rúm: Stovan

100 x 516
Lutur: **Trakt**
Rúm: Stovan

100 x 517
Lutur: **Ein partur av einari lýsilampu**
Rúm: Stovan

100 x 518
Lutur: **Fløska**
Um lutin/søga: Klár fløska við handtaki og hvítum plastikkproppi við skrúvugangi. Á fløskuni stendur: *1818, Pierre Smirnoff*
Rúm: Stovan

100 x 519
Lutur: **Fløska**
Um lutin/søga: Klár glasfløska við vøkrum mynstri og korkproppi. Á fløskuni stendur: *Idris London*
Rúm: Stovan

100 x 520
Lutur: **Fløska**
Um lutin/søga: Brún glasfløska við korkproppi – fýrkantað.
Rúm: Stovan

100 x 521
Lutur: **Tvær fløskur**
Um lutin/søga: Tvær klárar glasfløskur við korkproppi – vakurt formaðar við mynstri í.
Rúm: Stovan

100 x 522
Lutur: **Tvær fløskur**
Um lutin/søga: Tvær stórar dimmgrønar glasfløskur. Onnur hevur korkpropp, hin hevur skrúvupropp.
Rúm: Stovan

100 x 523
Lutur: **Tvær fløskur**
Um lutin/søga: Tvær fløskur við postalínsproppi við lásimekanismu. Onnur er klár, og á henni stendur bæði á proppinum og á glasinum: *Carlsberg*. Hin er grøn, og á proppinum stendur: *Hafnia*
Rúm: Stovan

100 x 524
Lutur: **Ein stór svørt glasfløska við korkproppi – fýrkantað**
Rúm: Stovan

100 x 525
Lutur: **Ein fløska**
Um lutin/søga: Ein brún, fløt glasfløska við mynstri. Proppurin er snapsaglas. Á proppinum stendur: *Montreal Canada. Consolidaied Distilleries Limited. Made in USA.*
Rúm: Stovan

100 x 526
Lutur: **Tvær rasp (tvær grovfílir)**
Rúm: Stovan

100 x 527
Lutur: **Strápartar til rokk**
Rúm: Stovan

100 x 528
Lutur: **Tvey høggujørn**
Rúm: Stovan

100 x 529
Lutur: **Ellivu amboð**
Um lutin/søga: Sjey amboð hava træskaft – restin ikki. Knívar, rasp, fílir og ymisk onnur amboð.
Rúm: Stovan

100 x 530
Lutur: **Eitt petti av einum tunnum, slitnum kvarnarsteini**
Rúm: Stovan

100 x 531
Lutur: **Korkajarn við træskafti**
Rúm: Stovan

100 x 532
Lutur: **Høggujarn við træskafti**
Rúm: Stovan

100  x 533
Lutur: **Holuhamari**
Rúm: Stovan

100 x 534
Lutur: **Flekiknívur við træskafti – gjørdur úr gomlum líggja**
Rúm: Stovan

100 x 535
Lutur: **Tvær stórar fílir við træskafti**
Um lutin/søga: Onnur fílin er fýrkantað – hin tríkantað.
Rúm: Stovan

100 x 536
Lutur: **Eplakvísl við stuttum tonnum**
Rúm: Stovan

100 x 537
Lutur: **Knívur við avrundaðum blaði**
Rúm: Stovan

100 x 538
Lutur: **Tummastokkur, ið kann leggjast saman**
Rúm: Stovan

100 x 539
Lutur: **Skammil**
Rúm: Stovan

100 x  540
Lutur: **Tvey hesputrø**
Um lutin/søga: Amboð at vinda tógv ella garn í hespu.
Rúm: Stovan

100 x 541
Lutur: **Fjallstavur**
Um lutin/søga: Ein fjallsstavur, sum Sivar gjørdi til Jegga í føðingardagsgávu í 1926, tá hann byrjaði at ganga burtur í haga. Á stavinum stendur: *I.I.B.NØ 25/1-1926*
Jeggi nýtti hendan stavin alt sítt lív sum seyðamaður. Hann var bert 15 ár, tá hann byrjaði (heimildarfólk: Hedvig).
Rúm: Stovan

100 x 542
Lutur: **Fjallstavur**
Um lutin/søga: Í fjallstavin er skorið: *J.J.B. 1955*. Helst hevur Jeggi gjørt hann sjálvur.
Rúm: Stovan

100 x 543
Lutur: **Rokkagjørð**
Um lutin/søga: Tann tunga rokkagjørðin var av einum dupultum rokki, sum varð brúktur, tá spinnast skuldi garn til vevin. Rokkurin hevur tvær gjarðir fyri at fáa meira snúning.
Tummas Joensen Skylv (pápi Johannu Mariu Skylv) hevði riggað til.
Rúm: Stovan

100 x 544
Lutur: **Klára**
Um lutin/søga: Klára at mylda við (at slætta veltu – eftir at sátt varð)
Rúm: Stovan

100 x 545
Lutur: **Garnvindari**
Rúm: Stovan

100 x 546
Lutur: **Ullarhøvil**
Um lutin/søga: Ullarhøvil varð brúktur, tá ið ull varð vaskað – at trýsta ullina undir í tvag (land varð nýtt til tvátt).
Rúm: Stovan

100 x 547
Lutur: **Tvey pør av kørðum – at karða ull við**
Rúm: Stovan

100 x 548
Lutur: **Fótarokkur**
Um lutin/søga: Elin Maria fekk rokkin frá Sigrid á Sundi. Hon tænti har, tá hon var ung genta – umleið 1884.
Rúm: Stovan

100 x 549
Lutur: **Oljulampa at heingja upp – brúkt í úthúsum**
Rúm: Stovan

100 x 550
Lutur: **Rokkur**
Rúm: Stovan

100 x 551
Lutur: **Ein kvørn**
Rúm: Stovan

100 x 552
Lutur: **Ein grótleypur (brotin)**
Rúm: Stovan

100 x 553
Lutur: **Ein fjallhetta, ið Jeggi hevur átt**
Rúm: Stovan

100 x 554
Lutur: **Gamalt vaflujarn við longum skøftum – ætlað til primus**
Rúm: Stovan

100 x 555
Lutur: **Tríggjar fleygastengur og trý pør av ørmum**
Um lutin/søga: Tvær fleygastengur koma frá Amaliu og eru málaðar við Farosit máling. Farosit máling varð gjørd úr royðugróti frá Hósmøl í Nólsoy.
Eina av fleygastongunum hevur Rúni Poulsen átt, og Einar Jacobsen (á Geilini) gjørdi hana til hansara í 1978. Armarnar hevur Óli Olsen gjørt, og Ivan holm hevur riðað netið (gjørt meskarnar) í 2005.
Rúm: Stovan

100 x 556
Lutur: **Mjólkingarskammil (fjósskammil)**
Rúm: Stovan

100 x 557
Lutur: **Tríggjar riðinálir – til at gera net til fleygastengur**
Rúm: Stovan

100 x 558
Lutur: **Lundapinnar**
Um lutin/søga: Lundapinnar í einum roðhylki, og nakrir pinnar liggja í einum plastikposa. Pinnarnir vórðu brúktir til at seta lundar upp á pinn – fyri at lokka aðrar lundar til.
Rúm: Stovan

100 x 560
Lutur: **Kirna – at gera smør í**
Rúm: Stovan

100 x 561
Lutur: **Tríggjar dyllur**
Um lutin/søga: Tríggjar dyllur at bera mjólk í, tá farið varð til neytar. Undir botninum á tí størstu dylluni stendur: *EMI*. Tvær dyllur við biðiskinnum og fetlum. Fetlarnar og biðiskinnini gjørdi Anna Juul Thomsen.
Rúm: Stovan

100 x 562
Lutur: **Tvey íløt úr træi við gjarðum**
Um lutin/søga: Eitt av íløtunum hevur oyru til handtak, og handtakið liggur leyst niðrií.
Rúm: Stovan

100 x 563
Lutur: **Fimm høvlar – ein av teimum er pinkalítil**
Rúm: Stovan

100 x 564
Lutur: **Langhøvil**
Rúm: Stovan

100 x 565
Lutur: **Tríggjar rívur**
Um lutin/søga: Í einari av teimum stendur skorið: *Hedvig*
Rúm: Stovan

100 x 566
Lutur: **Líggi**
Rúm: Stovan

100 x 567
Lutur: **Tvær dyllur úr jarni**
Rúm: Stovan

100 x 568
Lutur: **Eplakvísl**
Rúm: Stovan

100 x 569
Lutur: **Tveir nothøvlar – til at skera foyrur við**
Rúm: Stovan

100 x 570
Lutur: **Høvil**
Rúm: Stovan

100 x 571
Lutur: **Hosutræ**
Um lutin/søga: Tá bundið varð at selja til Kongliga Einahandilin, vórðu hosurnar tøvdar. Fyri at fáa tað rætta skapið, vórðu hosurnar smoygdar upp á eitt hosutræ.
Rúm: Stovan

100 x 572
Lutur: **Hampasnælda**
Um lutin/søga: Snælda at spinna reip, snøri og annað á (úr hampi).
Rúm: Stovan

100 x 573
Lutur: **Strúgvari (trækambur)**
Um lutin/søga: Strúgvari var ein kambur við grovum, ótøttum tindum, ið nýttur varð at reinsa hálm við. Hálmur varð nýttur at tekja við.
Rúm: Stovan

100 x 574
Lutur: **Rulla til vaðmal**
Rúm: Stovan

100 x 575
Lutur: **Rotuskógvar**
Um lutin/søga: Anna J. Thomsen hevur seymað úr barkaðum seyðaskinni.
Rúm: Stovan

100 x 576
Lutur: **Langsag**
Um lutin/søga: Gamli Jákup átti sagina. Hann brúkti hana, tá hann sagaði stokkin sundur, sum var brúktur til at byggja upp í húsini (ein part av stovuni í neðra) í 1828.
Tíðliga hetta árið (1828) strandaði ein mannleys fregatt í Saksun. Hon var fullfermd við pommerskum stokkum. Stokkarnir vórðu seldir á uppboði, og Gamli Jákup keypti ein av hesum stokkum. Teir brúktu trý eystføll um at sleipa plankan við árabáti til Nólsoyar: fyrsta eystfallið komu teir til Kvívíkar, annað til Sugguna í Kirkjubø og triðja til Nólsoyar.
Rúm: Stovan

100 x 577
Lutur: **Stór sag inni í trærammu (vit kenna ikki rætta heiti)**
Rúm: Stovan

100 x 578
Lutur: **Bogapassari at máta tjúkd við**
Rúm: Stovan

100 x 579
Lutur: **Blað av líggja**
Rúm: Stovan

100 x 580
Lutur: **Tveir vatnkaggar til bát**
Um lutin/søga: Á tí minna stendur: *IIB  NØ*
Rúm: Stovan

100 x 582
Lutur: **Kleppur**
Um lutin/søga: Í kleppin er skorið: *I.I.B. NØ.*
Rúm: Stovan

100 x 583
Lutur: **Eyskar**
Um lutin/søga: Í eyskarið er skorið: *B* og *Ø*
Rúm: Stovan

100 x 584
Lutur: **Útróðrarskrín**
Rúm: Stovan

100 x 585
Lutur: **4 leypar – ymiskar støddir**
Rúm: Stovan

100 x 586
Lutur: **Leypur**
Um lutin/søga: Jógvan við Brunn (Bøkjarin) hevur gjørt og átt leypin. Hann fekk viðin frá Emil hjá Lísbittu (frásøgn: Jeggi).
Rúm: Stovan

100 x 587
Lutur: **Leypur (varð nýttur, tá farið varð á seiðaberg)**
Rúm: Stovan

100 x 588
Lutur: **Amboð at skera hoyggj við – seta sjøtul á**
Um lutin/søga: Amboð úr jarni. Tvey træhandtøk.
Rúm: Stovan

100 x 589
Lutur: **Manglifjøl við rullu**
Rúm: Stovan

100 x 590
Lutur: **Manglifjøl**
Um lutin/søga: Malena Jacobsdatter av Strondum átti manglifjølina. Hon var født 03.03.1776 og doyði 01.09.1846. Malena var mamma Gamla Jákup. Í manglifjøluna er skorið: *M.I.D.*
Rúm: Stovan

100 x 591
Lutur: **Seks húskallar**
Um lutin/søga: Húskallar vórðu nýttir at fylla torvsekkir við. Trý trø – við nagla í ovara enda at heingja torvposan uppá – blivu stungin niður í jørðina. Hetta gjørdi tað møguligt, at bert ein maður fylti sekkirnar, uttan at ein livandi húskallur skuldi standa og halda í sekkinum. Tað sigst, at hetta er ein uppfinning úr Nólsoy.
Rúm: Stovan

100 x 592
Lutur: **Stampur – kann hava verið brúktur til mjólk**
Rúm: Stovan

100 x 593
Lutur: **Seks pinnagrev**
Um lutin/søga: Okkurt av teimum kemur úr Stuttholi. Í eitt av pinnagrevunum er gravað: *IIB*
Rúm: Stovan

100 x 594
Lutur: **Tríggir hakar**
Um lutin/søga: Í ein av teimum er gravað: *V.E.* – helst Valdemar Eide í Verkstað. Í ein annan er gravað: *IIB* – helst Jógvan Jacobsen Brunn.
Rúm: Stovan

100 x 595
Lutur: **Rundur steinur við kullu í**
Um lutin/søga: Steinurin hevur verið brúktur til at buka bark, kryddarí og annað.
Rúm: Stovan

100 x 596
Lutur: **Hvalvákn**
Rúm: Stovan

# Í Stuttholu

101 x 001
Lutur: **Postalínsfigurur**
Um lutin/søga: Eitt par, ið situr í einum heiðursportri.
Gevari: Dan Wang, 2011
Fyrrverandi eigari: Stutthol
Rúm: Eystara stova

101 x 002
Lutur: **Kirna**
Gevari: Dan Wang, 2011
Fyrrverandi eigari: Stutthol
Rúm: Eystara stova

101 x 003
Lutur: **Bismari – til at viga tálg og annað við**
Gevari: Dan Wang, 2011
Fyrrverandi eigari: Stutthol
Rúm: Eystara stova

101 x 004
Lutur: **Hesputræ**
Gevari: Dan Wang, 2011
Fyrrverandi eigari: Stutthol
Rúm: Eystara stova

101 x 005
Lutur: **Mortari við kúlvi**
Gevari: Dan Wang, 2011
Fyrrverandi eigari: Stutthol
Rúm: Eystara stova

101 x 006
Lutur: **Petroliumslampa**
Gevari: Dan Wang, 2011
Fyrrverandi eigari: Stutthol
Rúm: Eystara stova

101 x 007
Lutur: **Sukurskál og fløtakrúss**
Gevari: Dan Wang, 2011
Fyrrverandi eigari: Stutthol
Rúm: Vestara stova

101 x 008
Lutur: **Kaffikanna við gullgulum kanti**
Um lutin/søga: Myndevni á kaffikannuni er av gullgulum hagasóljum.
Gevari: Dan Wang, 2011
Fyrrverandi eigari: Stutthol
Rúm: Vestara stova

101 x 009
Lutur: **Bláur koppur við gullgulum kanti**
Gevari: Dan Wang, 2011
Fyrrverandi eigari: Stutthol
Rúm: Vestara stova

101 x 010
Lutur: **Mussilinmálað kongaligt postalín**
Um lutin/søga: 1 tekanna, 2 koppar, 2 undirskálir, 2 desserttallerkar og 1 kakuskál.
Gevari: Dan Wang, 2011
Fyrrverandi eigari: Stutthol
Rúm: Vestara stova

101 x 011
Lutur: **Útróðrarskrín**
Gevari: Dan Wang, 2011
Fyrrverandi eigari: Stutthol
Rúm: Eystara stova

101 x 012
Lutur: **Tveir leistir úr træi. Mál av stødd á fóti**
Gevari: Dan Wang, 2011
Fyrrverandi eigari: Stutthol
Rúm: Roykstova

101 x 013
Lutur: **Krúthorn**
Gevari: Dan Wang, 2011
Fyrrverandi eigari: Stutthol
Rúm: Roykstova

101 x 014
Lutur: **Leistur nýttur at bøta skógvar við**
Gevari: Dan Wang, 2011
Fyrrverandi eigari: Stutthol
Rúm: Stovan

101 x 015
Um lutin: **Rokkur**
Gevari: Dan Wang, 2011
Fyrrverandi eigari: Stutthol
Rúm: Stovan

## Á Botni

102 x 001
Lutur: **Globus og træborð**
Gevari: Petra Joensen
Fyrrverandi eigari: Niels á Botni
Rúm: Eystara stova

# Í Nýggjastovu

103 x 001
Lutur: **Trækista**
Gevari: Jens Christian Cramer Hansen (Gissa)
Fyrrverandi eigari: Nýggjastova
Rúm: Eystara stova

103 x 002
Lutur: **Stólur**
Um lutin/søga: Træstólur, sum hevur verið málaður grønur. Sigst vera úr Korndali. Nýggjastova var eitt hús, ið varð flutt úr Korndali.
Gevari: Jens Christian Cramer Hansen (Gissa)
Fyrrverandi eigari: Nýggjastova
Rúm: Eystara stova

103 x 003
Lutur: **Hálvliðugur træbátur**
Gevari: Jens Christian Cramer Hansen (Gissa)
Fyrrverandi eigari: Nýggjastova
Rúm: Eystara stova

# Í Kongsstovu

104 x 001
Lutur: **Dukka**
Um lutin/søga: Dukka úr Kongsstovu, sum Marianna (1905-1997) hevur átt. Dukkan hevði bert høvd, armar og bein. Anna J. Thomsen virkaði kropp, klæðir, hár og skógvar til dukkuna í 2009.
Á merkinum á høvdinum á dukkuni stendur: *370 A.M. 5/0 DEP. Made in Germany*
Rúm: Eystara stova

104 x 002
Lutur: **Leikutoy**
Um lutin/søga: Lítil salvukrukka úr Kongsstovu, sum Anna hevur fingið til vega mars 2004.
Fyrrverandi eigari: Kongsstova (kom í Brunn í 2005)
Rúm: Eystara stova

104 x 003
Lutur: **Leikutoysmøblar**
Um lutin/søga: Ein sofa, eitt sofaborð og tríggir stólar úr træi. Allir 5 lutirnir eru pólstraðir**.** Kom í Brunn 2004.
Gevari: Richard í Kongsstovu
Fyrrverandi eigari: Kongsstova
Rúm: Vestara stova

104 x 004
Lutur: **Leikutoysamboð**
Um lutin/søga: Oysa úr jarni, oysa úr træi, soðspón, lítil træknívur og spaki úr jarni.
Gevari: Richard í Kongsstovu
Fyrrverandi eigari: Kongsstova
Rúm: Vestara stova

104 x 005
Lutur: **Dukkustell**
Um lutin/søga: Dukkustell úr postalíni: 2 kaffikannur, 2 tekannur, mjólkarkrúss, smørílat, sósarskál við undirskál, 7 koppar við undirskál, 6 desserttallerkar og 2 skálir við grønum kanti.
Gevari: Richard í Kongsstovu
Fyrrverandi eigari: Kongsstova
Rúm: Vestara stova

104 x 006
Lutur: **Blusa og belti – bæði ljósareyð**
Gevari: Richard í Kongsstovu
Fyrrverandi eigari: Kongsstova
Rúm: Kamarið hjá Lovisu

104 x 007
Lutur: **Hvítur náttkjóli**
Gevari: Richard í Kongsstovu
Fyrrverandi eigari: Kongsstova
Rúm: Kamarið hjá Lovisu

104 x 008
Lutur: **Hvítur undirkjóli**
Gevari: Richard í Kongsstovu
Fyrrverandi eigari: Kongsstova
Rúm: Kamarið hjá Lovisu

104 x 009
Lutur: **Stór træsleiv**
Gevari: Richard í Kongsstovu
Fyrrverandi eigari: Kongsstova
Rúm: Roykstovan

104 x 010
Lutur: **Halakola – nýtt til ljós**
Gevari: Richard í Kongsstovu
Fyrrverandi eigari: Kongsstova
Rúm: Stovan

104 x 011
Lutur: **Teppi – grøntpuntut**
Fyrrverandi eigari: Kongsstova
Rúm: Kamarið hjá Lovisu

# Hjá Krebsi

105 x 001
Lutur: **Petroliumslampa – at heingja upp**
Um lutin/søga: Peter Jacob Petersen (vanliga eisini nevndur bara Petersen). Petersen var sonur Johan Henrik Klingberg Krebs Petersen, vanliga kallaður Gamli Krebs. Bæði faðir og sonur vóru keypmenn.
Fyrrverandi eigari: Petersen
Rúm:  Eystara stova

105 x 002
Lutur: **Fjallstavur**
Um lutin/søga: Ein útskorin fjallstavur, ið Johannes Pauli Hammer hevur átt. Hammer varð giftur við Heina Mariu. Dóttir teirra, Sigrid Malene Hammer, varð gift við Peter Jacob, vanliga eisini nevndur bara Petersen.
Gevari: Richard í Kongsstovu, 2005
Fyrrverandi eigari: Petersen
Rúm: Stovan

105 x 003
Lutur: **Kaffimylla (kaffimylna, kaffikvørn)**
Gevari: Bárður Poulsen
Fyrrverandi eigari: Petersen
Rúm: Rúmið millum kamarið hjá Lovisu og eystaru stovu

# Á Lambamýru

106 x 001
Lutur: **Koppur**
Um lutin/søga: Koppur frá kongsvitjanini í Føroyum í 1907. Koppar av hesum slagi vóru í nógvum húsum.
Fyrrverandi eigari: Lambamýra
Rúm: Eystara stova

106 x 002
Lutur: **Tríggir koppar og ein undirskál**
Um lutin/søga: Tríggir koppar og ein undirskál frá viktoriansku tíðini. Victoria (1819-1901) var drotning í Bretlandi frá 1837. Drotningin er avmyndað á øllum íløtunum, og á skálini síggjast eisini myndir frá Asia, India, Australia og Afrika.
Fyrrverandi eigari: Lambamýra
Rúm: Eystara stova

106 x 003
Lutur: **Tíningartrog**
Um lutin/søga: Í tíningartrogið er skorið: *KJ* , og tað stendur fyri Kristinu Joensen (Stinu á Lambamýru).
Gevari: Anna Thomsen
Fyrrverandi eigari: Lambamýra
Rúm: Roykstovan

106 x 004
Lutur: **Ripari**
Gevari: Anna Thomsen
Fyrrverandi eigari: Lambamýra
Rúm: Roykstovan

106 x 005
Lutur: **Treskitræ**
Gevari: Anna Thomsen
Fyrrverandi eigari: Lambamýra
Rúm: Roykstovan

# Á Válinum

107 x 001
Lutur: **Lítil koppur við undirskál**
Um lutin/søga: Lítil koppur við undirskál, sum Ásla fekk frá Oliviu (1895-1931). Olivia var systir Elviru (1899-1984). Olivia doyði av tuberklum – bert 36 ára gomul (frásøgn: Ásla).
Fyrrverandi eigari: Ásla á Válinum
Rúm: Eystara stova

107 x 002
Lutur: **Størri koppur við undirskál**
Um lutin/søga: Størri koppur, sum Ásla fekk frá Gudrun (1897-1934). Gudrun var systir Elviru á Válinum (1899-1984). Gudrun doyði av tuberklum – bert 37 ára gomul (frásøgn: Ásla).
Fyrrverandi eigari: Ásla á Válinum
Rúm: Eystara stova

107 x 003
Lutur: **Tríggir koppar við kannu, sukurskál og fløtakrússi**
Um lutin/søga: Tríggir koppar við kannu, sukurskál og fløtakrússi, sum Sanna á Válinum hevur átt. Susanne Poulsen, úr Nýggjastovu (Sanna á Válinum, 1858-1941) var mamma Elviru og omma Áslu (frásøgn: Ásla).
Fyrrverandi eigari: Ásla á Válinum
Rúm: Eystara stova

# Við Nýggjagarð

108 x 001
Lutur: **Brúdleyps-, konfirmatións- og føðingardagskort**
Um lutin/søga: Brúdleyps-, konfirmatións- og føðingardagskort hjá Maren Malene (1895-1971) og Daniel Mathæus Danielsen (1887-1974) við Nýggjagarð – frá umleið 1914.
Fyrrverandi eigari: Hildibjørt Gulklett
Rúm: Eystara stova

108 x 002
Lutur: **Vøgga**
Um lutin/søga: Hvít vøgga úr træi, sum Daniel Mathæus Danielsen við Nýggjagarð smíðaði til sonin Mikkjal í 1915. Mikkjal skifti seinni eftirnavn til Gulklett.
Í vøgguni liggur ein dukka, sum Hildibjørt hevur bundið klæðini til.
Fyrrverandi eigari: Hildibjørt Gulklett
Rúm: Vestara stova

108 x 003
Lutur: **Karðar**
Gevari: Eyðálvur Gulklett
Fyrrverandi eigari: Dánjal og Lena við Nýggjagarð
Rúm: Vestara stova

108 x 004
Lutur: **Treskitræ**
Um lutin/søga: Treskitræðið hevur verið brotið, men er snøgt afturgjørt. Í treskitræðið er skorið: *MMH. NØ. 1913.(Maren Malene Hansen)*
Gevari: Eyðálvur Gulklett
Fyrrverandi eigari: Lena við Nýggjagarð
Rúm: Roykstovan

108 x 005
Lutur: **Loftslampa úr messing**
Um lutin/søga: Brúðargáva hjá Maren Malene Hansen og Daniel M. Danielsen (1914).
Gevari: Valborg Gulklett Arge
Rúm: Eystara stova

108 x 006
Lutur: **Mynd av Mariu og Jesusbarninum**
Gevari: Valborg Gulklett Arge
Rúm: Eystara stova

# Marnar á Skúr

109 x 001
Lutur: **Tveir træseymir og eitt spølkummubrot**
Um lutin/søga: Summarið 2009 varð grivið út fyri kloakk í túninum niðan fyri húsini á Skúr, og tá fann Marnar annan av træseymunum og spølkummubrotið. Hin seymin fann hann úti við Pakkhúsið.
Gevari: Marnar á Skúr
Fyrrverandi eigari: Marnar á Skúr
Rúm: Eystara stova

109 x 002
Lutur: **Garnvindari**
Gevari: Marnar á Skúr
Fyrrverandi eigari: Á Skúr
Rúm: Stovan

# Nicolaj Falck

110 x 001
Lutur: **Rennilsbrot og tvey grótstykki**
Um lutin/søga: Rennilsbrot úr gróti og tvey smá grótstykki, ið síggja út til at hava verið brúkt til eitthvørt arbeiði.
Fyrrverandi eigari: Nikolaj hevur funnið hesar lutirnar.
Rúm: Eystara stova

# Georg Kjærbo

111 x 001
Lutur: **Reyð pera**
Um lutin/søga: Hetta er fyrsta peran, sum varð sett í, tá molin varð longdur í 1965. Hetta var ein neyðpera, sum varð skift út eftir 14 døgum (frásøgn: Georg Kjærbo).
Gevari: Georg Kjærbo
Fyrrverandi eigari: Georg Kjærbo
Rúm: Eystara stova

111 x 002
Lutur: **Hondvaskimaskina**
Um lutin/søga: Hondvaskimaskina frá 40 - ella 50-árunum. Sagt verður, at maskinan skuldi malast 50 ferðir tann eina vegin, og síðani 50 ferðir hinvegin.
Gevari: Georg Kjærbo, 2004
Fyrrverandi eigari: Georg Kjærbo
Rúm: Stovan

111 x 003
Lutur: **2 primuslyktir**
Gevari: Georg Kjærbo, 2004
Fyrrverandi eigari: Georg Kjærbo
Rúm: Stovan

111 x 004
Lutur: **Taska**
Um lutin/søga: Heimagjørd taska. Nýtt til at hava mat í, tá útiarbeiði var fyri – eitt nú torvarbeiði og annað.
Gevari: Georg Kjærbo, 2012
Fyrrverandi eigari: Georg Kjærbo
Rúm: Stovan

# Neystið hjá Óla Olsen

112 x 001
Lutur: **Gráur kassi**
Um lutin/søga: Gráur kassi úr træi, ið Óli hevur gjørt til at goyma Varðan í.
Fyrrverandi eigari: Óli Olsen
Rúm: Vestara stova

# Ókendur uppruni

113 x 001
Lutur: **Ein stór toyrulla – at pressa klæði við**
Rúm: Vestara stova

113 x 002
Lutur: **Ein rulla við sjókortum**
Rúm: Vestara stova

# Hjá Klæminti

114 x 001
Lutur: **Kassi**
Um lutin/søga: Kassi hjá Anders – nýttur at goyma amboð í.
Gevari: Klæmint Jacobsen, 2004
Fyrrverandi eigari: Klæmint Jacobsen
Rúm: Vestara stova

114 x 002
Lutur: **Rokkur**
Um lutin/søga: Rokkur, sum Jalli (Hjalgrím Jacobsen) hevur gjørt.
Gevari: Klæmint Jacobsen, 2004
Fyrrverandi eigari: Klæmint Jacobsen
Rúm: Vestara stova

114 x 003
Lutur: **Karðar**
Um lutin/søga: Karðar, sum Jalli hevur átt. Helst hevur hann gjørt teir sjálvur.
Gevari: Klæmint Jacobsen, 2004
Fyrrverandi eigari: Klæmint Jacobsen
Rúm: Vestara stova

114 x 004
Lutur: **Mortari**
Um lutin/søga: Illa rustaður mortari. Kúlvurin (málmstongin) manglar.
Gevari: Klæmint Jacobsen, 2004
Fyrrverandi eigari: Klæmint Jacobsen
Rúm: Roykstovan

114 x 005
Lutur: **Eitt ílat av træi við gjarðum**
Gevari: Klæmint Jacobsen, 2004
Fyrrverandi eigari: Klæmint Jacobsen
Rúm: Stovan

114 x 006
Lutur: **Langhøvil**
Gevari: Klæmint Jacobsen, 2004
Fyrrverandi eigari: Klæmint Jacobsen
Rúm: Stovan

114 x 007
Lutur: **Trý vaskibretti**
Um lutin/søga: Tvey stór vaskibretti og eitt lítið.
Gevari: Klæmint Jacobsen í 2004
Fyrrverandi eigari: Hjá Klæminti
Rúm: Stovan

114 x 008
Lutur: **Balja úr træi – við gjørðum**
Gevari: Klæmint Jacobsen í 2004
Fyrrverandi eigari: Hjá Klæminti
Rúm: Stovan

# Á Geil

115 x 001
Lutur: **Handsnælda**
Fyrrverandi eigari: Á Geil
Rúm: Vestara stova

# Magnusarstova

116 x 001
Lutur: **Hvítur náttpottur**
Gevari: Anna Thomsen
Fyrrverandi eigari: Magnusarstova
Rúm: Vestara stova

# Í Verkstað

117 x 001
Lutur: **Kjøtmaskina**
Gevari: Sólbjørg Lindenskov
Fyrrverandi eigari: Í Verkstað
Rúm: Spískamarið

117 x 002
Lutur: **Breyðskerari**
Gevari: Sólbjørg Lindenskov
Fyrrverandi eigari: Í Verkstað
Rúm: Spískamarið

117 x 003
Lutur: **Vaflujarn við stativi, sum jarnið kann vendast í**
Gevari: Sólbjørg Lindenskov
Fyrrverandi eigari: Í Verkstað
Rúm: Spískamarið

117 x 004
Lutur: **Stórur pottur til komfýrin**
Gevari: Sólbjørg Lindenskov
Fyrrverandi eigari: Í Verkstað
Rúm: Roykstovan (undir borðinum við vaskið)

117 x 005
Lutur: **Tvey strúkijørn**
Gevari: Sólbjørg Lindenskov
Fyrrverandi eigari: Í Verkstað
Rúm: Roykstovan

117 x 006
Lutur: **Ein lítil grýta at seta niður í ringarnar á komfýrinum**
Gevari: Sólbjørg Lindenskov
Fyrrverandi eigari: Í Verkstað
Rúm: Roykstovan

117 x 007
Lutur: **Tvær Geneverfløskur (leirfløskur)**
Um lutin/søga: Onnur er hvít og hevur tundurpropp. Hin er ljósabrún og hevur skrúvupropp.
Fyrrverandi eigari: Í Verkstað
Rúm: Stovan

# Í Liða

118 x 001
Lutur: **Tufla og tveir pípuheysar**
Um lutin/søga: Funnin undir gólvinum í Liða.
Gevari: Nicolaj Falck
Fyrrverandi eigari: Í Liða
Rúm: Roykstovan

118 x 002
Lutur: **Ein tunnur, slitin kvarnarsteinur**
Um lutin/søga: Funnin undir gólvinum í Liða.
Gevari: Nicolaj Falck
Fyrrverandi eigari: Í Liða
Rúm: Roykstovan

118 x 003
Lutur: **Ein kvarnarsteinur, ið hevur verið nýttur sum laðing undir syllini**
Um lutin/søga: Funnin undir gólvinum í Liða.
Gevari: Nicolaj Falck
Fyrrverandi eigari: Í Liða
Rúm: Roykstovan

# Maud Wang Hansen

119 x 001
Lutur: **Hvalvákn**
Um lutin/søga: Í hvalváknið er gravað: *E. H.*
Gevari: Maud Wang Hansen
Fyrrverandi eigari: Erling Hansen
Rúm: Stovan

119 x 002
Lutur: **Tríggjar gassmaskur**
Um lutin/søga: Gassmaskur hjá Erlingi Hansen, Thominu W. Hansen og Aslaug Hansen.
Gevari: Maud Wang Hansen
Fyrrverandi eigari: Erling Hansen
Rúm: Eystara stova (í kistuni)

# Bjarni Tórgarð Brattaberg

120 x 001



**Køkufat**

Um lutin/søga: Ellen Marie Joensdatter, f. 04.01.1809, d. 22.04.1902, var ættað úr Smiðjuni í Miðvági. Ellen Marie tænir hjá Christian Pløyen, sum var fúti í Føroyum frá 1830 til 1837, og amtmaður samastaðni frá 1837 til 1849.
Pløyen dugdi sera væl at seta seg inn í føroysk viðurskifti, og hann er tann danski embætismaður, ið føroyingar hava hildið mest av.
Pløyen yrkir grindavísuna í árinum 1835. Ellen Marie situr undir og skrivar grindavísuna niður so hvørt, sum Pløyen yrkir. Sum samsýning fær Ellen Marie hetta fatið til gávis frá Pløyen fúta. Fatið er 24 cm langt og 22 cm breitt – ljóst við breiðum blómugullkanti.

Ellen Marie giftist við Hans Paula Johannesen á Trappuni (úr Nýggjastovu), nevndur Kapparin, úr Nólsoy.

Ellen Marie gav ommudóttur síni, Martinu Eide í Nólsoy, fatið. Síðani gav Martina fatið til ommudóttur sína, Onnu Poulinu Wenningsted Tórgarð (ið tá var á ungum árum) – vanliga nevnd Diste. Meðan Diste hevur havt fatið í varðveitslu, hevur hon havt tað við sær – fyrst í Tórshavn, síðani í Keypmannahavn. Haðani kom hon til Vágs eftir seinna veraldarbardaga. Síðani hevur hon havt fatið við sær í Vági, við Fámará og við Krosslið. Diste gevur so soni sínum Bjarna Tórgarð Brattaberg fatið. Hann hevur so fatið í heimi sínum á Krossjørð í Vági.

Bjarni tekur fatið við sær, tá ið hann á regattasigling við Johonnu, TG 326, leggur at í Nólsoy. Hann letur hervið fatið aftur til Nólsoyar – í varðveitslu til savnið við Brunn.

Vágur, hin 03.07.2014

Vinaliga

Bjarni T. Brattaberg

Rúm: Vestara stova

# Iris Kjærbo

121 x 001



**Dukka**

Um lutin/søga: Ellen Sophia Joensen, f. 20.09.1868, d. 26.01.1947, fekk hesa dukkuna í dópsgávu frá einari prestakonu.
Hon gav hana so víðari til sítt fyrsta gentuommubarn, Mathildu Kjærbo (fødd Danielsen),
f. 26.07.1917, d. 19.04.1981.
Mathilda gav síðan dukkuna víðari til sítt fyrsta gentuommubarn, Iris Kjærbo Hansen,
f. 04.12.1957.

Elin Sofia var ættað úr Leigustovuni á Toftum og giftist í Nólsoyar kirkju, tann 6. november 1889, við Hans Michael Hansen úr Magnusarstovu, f. 26.07.1861, d. 29.05.1936.

Rúm: Eystara stova

# Nora Tausen

122 x 001





**Millumhálari**

Um lutin/søga: Hesin millumhálarin varð nýttur til rennistrongin á Reyðastígi. Hann lá í húsinum hjá Onnu og Hans Andreas Jacobsen (Hanna). Nora Tausen lat hann til savnið í 2017.

Rúm: Rúmið millum kamarið hjá Lovisu og eystaru stovu

# Posthúsið

123 x 001



**Grindakíkur**

Um lutin/søga: Hesin grindakíkurin lá á posthúsloftinum. Latin av Onnu og Høgna Thomsen í 2017.

Rúm: Rúmið millum kamarið hjá Lovisu og eystaru stovu (hongur á vegginum)